

# FRØÐI

1 / 2022 27. árg. kr. 48,-

*Les eisini*

MODERNAÐI PÁPIN MILLUM **FORTÍÐ OG FRAMTÍÐ** S. 4

**RINGUR KOSTUR** OYÐILEGÐI HEILSU FØROYINGA S. 16

LAKSALÍVIÐ UNDIR **STÓRU ALDUNUM** S. 8

SÍGGJA VEÐURLAGIÐ Í **300 ÁRA GOMLUM KIRKJUTÍGGINDUM** S. 26

**FYRSTU ORÐINI** HJÁ FØROYSKUM BØRNUM S. 32

## KALDAR OYGGJAR *eru cool*

# Frøði hesaferð!

Pápin hevur sum heild verið ósjónligur í orðaskiftinum um kyn, familjulív og barnauppaling í miðlunum í Føroyum. Seinastu árini er vend tó so smátt komin í, og í dag er semja um, at tørvur er á einum fjølbroyttari kjaki, ið eisini varpar ljós á umstøðurnar og sjónarmiðini hjá monnum. Firouz Gaini stendur fyri eini verkætlan um leiklutin hjá føroyska pápanum og greiðir frá nøkrum av úrslitunum.

Ása Johannesen hevur í fleiri ár granskað í trivnaðinum hjá laksi. Nú alingin otar seg út har aldurnar bróta, setir hon sjóneykuna á, hvussu laksurin trívist. Ein niðurstøða er, at laksur mangan doyr í tungari aldu. Men samanumtikið klárar laksur seg væl í bæði streymi og aldu, og tað snýr seg um at finna alihættir, har til ber at hýsa laksinum undir vatnskorpuni.

Jens-Kjeld Jensen skrivar forkunnuga grein um fornu plantuna Vatnspíri, sum veksur í eini tjørn í Nólsoy.

Broytingartíðirnar í 1800'talinum høvdu við sær ringar matvanar, og tað gekk aftur á hondina heilsuliga hjá nógvum føroyingum. Serliga kvinnurnar mistrivust. Tørvur var tí á upplýsing um føðslu, og ynski vóru frammi um at venda gongdini. Lív Arge Simonsen hevur skrivað áhugaverda grein um hesi viðurskifti og um at tær royndir, ið skuldu bøta um trivnaðin.

Rolf Guttesen hevur við grundarlag í kirkjutíggjundum í tíðarskeiðinum 1693-1900 kannað, hvussu veðurlagið hevur háttað sær hesi árini. Aðrar keldur eru eisini um veðurlagið fyrr. Sum heild vísa útrokningarnar, at veðurlagið hevur verið sera ymiskt og hetta sæst aftur í samfelagsbúskapinum, millum annað í tíggjundarroknskapunum.

Sissal M. Rasmussen hevur í eini kanning víst á, at tað hevur stóran týdning, hvussu stórt orðafeingi er hjá børnum, tá børn samskifta. Tað er stórur munur á, hvussu nógv orð einstøku børnini duga. Hesir munir síggjast tíðliga og kunnu halda á í uppvøkstrinum. Munirnir eru knýttir at ymsum umstøðum, m.a. málsliga umhvørvinum hjá barninum, alt eftir hvussu nógv og á hvønn hátt tosað verður við barnið.

Í Føroyum hava vit nógvar firðir og nógv sund, men í nýggjari gransking vísir Sissal Vágsheyg Erenbjerg á, at vit eisini hava 'fjarðakend' sund. Sum dømi í grein, sum Sissal og Bogi Hansen skriva, nevna tey Sundalagið norðan fyri Streymin. Tey staðfesta, at tann sunnasti parturin av Sundalagnum er miðdepil í einum sonevndum amphidromum økið í Norðuratlantshavinum. Fyribrigdið ger, at Sundalagið norðan fyri Streymin fær nýggjan, útskiftan sjógv í miðal eina viku norðureftir og eina viku suðureftir.

Seinastu greinina skrivar Bergur Rønne Moberg um nýggja hugtakið destinatiónsbygging. Talan er um eitt nýtt slag av tjóðar- og staðarbygging - at byggja land við kreativiteti, innovatión, mentan og list. Kaldar oyggjar eru vorðnar cool, og Føroyar branda seg og sítt landslag, náttúrutilfeingi, mentanartilfeingi og list við góðum úrsliti.

Gott summar!


FRØÐI 1 / 2022

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG
GEVUR FRØÐI ÚT


© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.


Frøði er fólksligt vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Upplag 1.300
ISSN 1395-0045
Forsíðumynd: Tórður Mikkelsen
*Loyvt er at endurgeva úr Frøði, um víst verður til heimildina. Verða heilar greinir endurgivnar, má avtala gerast.*

AVGREIÐSLA
Jarðfeingi, J. Paturssonargøta 32-34
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur: frodi@jf.fo

RITSTUÐLAR
Fróðskaparsetur Føroya
Tjóðskjalasavnið
Tjóðsavnið
Landsbókasavnið
Havstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Umhvørvisstovan

NÝGGIR HALDARAR
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI
fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

GREINIR TIL BLAÐIÐ
Fólksligar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundsleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

LÝSINGAR TIL FRØÐI
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við avgreiðsluna,
telefon 357000
fax 357001
teldupostur: frodi@jf.fo

LÝSINGARPRÍSUR
Heil síða:kr. 5.000,-
Hálv síða:kr. 3.000,-

RITUMBOÐSRÁÐIÐ
Erling Isholm, Fróðskaparsetur Føroya
Erla Olsen, Fróðskaparsetur Føroya
Sámal Tróndur Johansen, Tjóðskjalasavnið
Bjørg Mikkelsen, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Katrin Hoydal, Umhvørvisstovan
Lis Mortensen, Jarðfeingi
Eilif Gaard, Havstovan
Unn Patursson, Føroya Landsbókasavn

GRAFISK FRAMLEIÐSLA
OG PRENT: Føroyaprent

SAMSKIPARI
Helgi Jacobsen

RITSTJÓRN
Erling Isholm, *ábyrgd*
Birgitta Andreasen
Sissal Maria Rasmussen
Maria Nielsdóttir
Sissal Vágsheyg Erenbjerg

FRÓÐSKAPARFELAG FØROYA
Heimasíða: www.frodskaparfelag.fo
Limagjald: 300 krónur um árið, at gjalda á kontu í Eik Banka 9181-495.171.0
SWIFT code: EIKBFOTF,
Iban-no: F056 9181 0004 9517 10
*Minnist til at viðmerkja navn.*











# Innihald


4 MODERNAÐI PÁPIN MILLUM FORTÍÐ OG FRAMTÍÐ
Firouz Gaini

8 TÁ IÐ ALDURNAR BRÓTA
Ása Johannesen

14 VATNSPÍRI - EIN FORN PLANTA Í NÓLSOY
Jens-Kjeld Jensen

16 RINGUR KOSTUR OYÐILEGDI HEILSU FØROYINGA
Lív Arge Simonsen

26 KIRKJUTÍGGJUND 1693-1900 SUM UPPLÝSING UM SKIFTANDI VEÐURLAG FYRR Í TÍÐINI
Rolf Guttesen

32 FYRSTU ORÐINI HJÁ FØROYSKUM BØRNUM
Sissal M. Rasmussen

36 TAÐ FYRSTA "FJARÐAKENDA" SUNDIÐ
Sissal Vágsheyg Erenbjerg og Bogi Hansen

42 DESTINATÓNSBYGGING - EITT NÝTT SLAG AV TJÓÐAR- OG STAÐARBYGGING
Bergur Rønne Moberg

# PÁPAR OG FAMILJULÍV Í FØROYUM

## Modernaði pápin millum fortíð og framtíð



**Firouz Gaini**
FirouzG@setur.fo
Professari í antropologi
Søgu- og Samfelagsdeildin
Fróðskaparsetur Føroya

Tá ið vit í Føroyum kjakast um familjuviðurskifti og foreldraleiklutir, so er tað sum oftast við mammuni í brennideplinum. Pápin hevur sum heild verið rættiliga ósjónligur í orðaskiftinum um kyn, familjulív og barnauppaling í miðlunum her heima. Seinastu árini er vend tó so smátt komin í, og í dag tykist breið semja vera millum politikarar og fakfólk um, at tørvur er á einum fjølbroyttari kjaki, ið eisini varpar ljós á umstøðurnar og sjónarmiðini hjá monnum.

Vansin við at ikki seta sjóneykuna á pápan, er at gamlar mýtur um, hvussu føroyskir menn hugsa og liva, sleppa at liva víðari, sum vóru tær høgdar í stein. Ein annar trupulleiki er, at vantandi vitan um pápar forðar fyri menning av einum góðum føroyskum familjupolitikki. Harvið er eisini sagt, at tørvur er á nýggjari gransking, ið kann geva okkum ríka vitan um leiklutin hjá pápanum í føroysku familjuni í dag.

### Nýggjar tíðir, nýggir menn?

Samfelagið er nógv broytt síðan seinasta aldaskiftið, og alt fleiri mátar at liva sum familja – við ella uttan børn, gift ella ógift, stakur ella við maka – eru at síggja í Føroyum. Fólk flest eru samd um, at føroyingar eru sera familjukærir. Hinvegin eru vit ikki so samd í spurninginum um, hvussu ein føroysk familja sær út. Og flestu menninir ynskja at fáa sær børn – at blíva pápar – men teir eru rættiliga ymiskir á máli, tá ið teir skulu greiða frá, hvat ið ein pápi „eigur“ at duga og gera í 21. øld.

Flestu føroysku páparnir eru „modernaðir“ menn, men hetta merkir sjáldan, at teir hava mist sambandið við fortíðina. „Nýggi“ maðurin, ið er nærverandi og umsorgarfullur, og sum leggur orku í at geva sítt íkast til húsliga arbeiðið, er eisini ein pápi, ið ynskir

**Brot úr samrøðu**

Pápi: „Eg minnist omma mín plagdi altíð at siga, at tá abbi mín skuldi út at trilla, tað var skomm, tað gjørdi man ikki tá, ha? Man hongdi ikki blæur upp á snórin, tað var fúl skomm. Altso, tað gjørdi omma, mammurnar gjørdi tað. Nú fara vit í barsil og vit rudda og vit vaska, og vit gera øll tey tingini, sum mammurnar ella konufólkini gera, ha? Og tað er fint, tað passar mær fint, men allikavæl, eg haldi at tað eru nøkur ting…sum vit menn bara ikki skulu gera… Nú tosar man so ræðuliga nógv um, at alt skal verða líka fyri líka. Javnrættindi…eitt sindur blást upp í dag, eitt sindur hysteriskt, haldi eg.“

at geva børnum sínum tað besta úr mentanini, sum hann sjálvur vaks upp í. Ein nýggj føroysk granskingarverkætlan um pápar og familjulív vísir, at flestu páparnir liva eitt sokallað modernað familjulív, har ið pápin hevur ein virknan leiklut í barnauppalingini og vanliga húsliga arbeiðinum heima, og har ið foreldrini samráðast sínámillum, um hvussu gerandisdagurin hjá húskinum skal samskipast og fyrireikast. Páparnir eru tó eisini menn, ið hava ein maskulinitet, ið teir onkursvegna skulu sýna fram í gerð og talu.

### Tann góði pápin

Í akademiska kjakinum um menn og nýggjar kynssamleikar verður „nýggi“ maðurin („new man“ á enskum) í stuttum lýstur sum ein pápi, ið ynskir at hava eitt familjulív, har ið bæði foreldrini njóta somu rættindi og somu tign, og har ið foreldrini á stórt sæð øllum økjum – undantikið bróstageving – kunnu taka sær av somu uppgávum. Talan er um ein „bleytan“ nærverandi mann, sum vísir kenslur og brúkar nógva tíð saman við børnunum – eisini pinkubørnunum. Hann er ábyrgdarfullur, mildur av lyndi og hevur ein „sunnan“ maskulinitet, ið endurspeglar stóra virðing fyri kvinnum. Hann er ein tollyntur „demokratiskur“ pápi, ið fer í pápafarloyvi, luttekur á foreldrafundum, fyrireikar barnaføðingardagar, luttekur í kjaki um barnauppaling, og so framvegis.

Ofta vil hann eisini bera seg fram sum ein pápa, ið stuðlar rættindunum hjá monnum úr minnilutabólkum í samfelagnum – til dømis samkyndar pápar, tilflytarar og stakar uppihaldarar. Spurningurin er, hvat ið er nýtt við „nýggja“ manninum: hvør var undangongumaður



*Pápi og sonur í Havn (mynd: Firouz Gaini)*

**Um verkætlanina**

*„Faðirskapur í broyting? Kanning av gerandislívinum, familjuviðurskiftunum og maskulinitetinum hjá monnum – tvørtur um tvey ættarlið – í Føroyum í dag“* (2019-2022). Granskingarverkætlan á Fróðskaparsetri Føroya. Verkætlanarleiðari: Firouz Gaini. Aðrir luttakarar: Jónleyg Djurhuus, Gunnhild Persson, Runa Preeti Ísfeld, Ibrar Ali og Elsa Maria H. Hansen. Empiriskt tilfar: landsumfatandi spurnakanning og einstaklingasamrøður. Granskingarráðið, Fróðskaparsetur Føroya og Javnstøðunevndin fíggjaðu verkætlanina.

### Brot úr samrøðu

Pápi: „Ja, ein góður pápi, ja hann skal vera alt møguligt. Hann skal vera hesin her kjerligi, og hann skal eisini vera hesin strangi, og onkuntíð eitt sindur harði, og eisini vera tann stuttligi… tað eru øgiliga nógvir leiklutir, haldi eg, sum man koyrir í ein pott, ha?"

hansara? Og hvørjir pápar kenna seg í roynd og veru aftur í myndini av „nýggja" pápanum?

## Familja og mentan

Í samrøðunum við føroyskar pápar í kanningini hjá okkum kemur ein meira samansett mynd av maskulinitetinum hjá pápanum fram: maðurin hevur gaman í virðir og áhugamál, ið vit lættliga kunnu seta í samband við „nýggja" mannin og modernaðu familjuna, men hann er eisini partur av einari mentan, ið altíð hevur virðismett mannin fyri styrki, ágrýtni og treysti í arbeiði á landi og sjógvi. Hann var ein uppihaldari, ið noyddist at vera nógv burturi. Og hetta er framvegis galdandi í nógvum familjum í landinum.

Tað er munur á at vera pápi í einum stórum býi í Norðurevropa – til dømis Stockholm ella Keypmannahavn – og at vera pápi í Føroyum. Tað er eisini munur á at vera pápi í akademikarafamilju í Hoyvík og at vera pápi í sjómannafamilju í Norðuroyggjum. Tann nýggja ráðandi myndin av hvussu ein góður pápi eigur at vera – sum í lýsingini av „nýggja" tollynta manninum omanfyri – hóskar serliga væl til lívið í miðalstættarfamiljuni í stóra modernaða býnum. Aðrar familjur, ið hava aðrar fatanir av, hvussu foreldur og børn eiga at samskifta og samstarva, og sum ofta hava eitt heilt annað tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, vera harvið eisini ofta umrøddar sum veikar og neiligar útgávur av fyrimyndarligu modernaðu familjuni hjá „nýggja" manninum.



Føroyski pápin er partur av eini mentan, ið altíð hevur virðismett hann fyri styrki, ágrýtni og treysti í arbeiði á landi og sjógvi. Mynd: Sitha Sivanantham

## At finna sítt pláss

Í kanningini hjá okkum síggja vit nøkur ting, ið flestu páparnir tykjast vera samdir í, líkamikið hvar í landinum teir búgva. At vera pápi í dag er nakað heilt annað, enn tað var fyri 30-40 árum síðani. Pápar eru meira heima, meira saman við børnunum, og meira tilvitaðir um spurningar um javnrættindi og umsorgan í familjuni í dag. Til dømis er nærmast krav nú, at pápin er við á føðistovuni – og eisini klippir nalvastrongin, meðan hann verður fotograferaður – tá ið børnini koma í verðina.

Vit síggja eisini, at tað kann vera trupult hjá pápum at liva upp til øll tey krøv, ið modernaða lívið inniber. Pápar stríðast við at finna eina javnvág millum arbeiðs- og heimalív, millum modernaða og siðbundna maskulinitetin, og millum fortíð og framtíð. Kanningin avdúkar eisini, at nógvir pápar ongantíð veruliga tosa um pápaleiklutin. At vera pápi er nakað, ið teir gera uttan at tosa um tað. Teir ynskja ikki at gera ov nógv hóvasták burtur úr hesum. Páparnir tosa nógv um hvussu nógv, ið er broytt í familjuni, síðan teir sjálvir vóru smádreingir. Teir flestu eru samdir í, at nógv er broytt til tað betra. At børnini trívast betri, tá ið tey hava eitt tætt og fjálgt samband við pápan. At pápin kann vera „bleytur" og vísa kenslur.

### Brot úr samrøðu

Pápi: „Altso, vissi tú lesur Heðin Brú ella Martin Joensen ella onkran sovorðnan, so er leikluturin øgiliga fast defineraður, og tað er ikki ordiliga tað samfelagið, vit búgva í nú. Tí at verðin er jú nógv øðrvísi nú, enn tá eg var barn, sjálvandi eru tey grundleggjandi tingini enn tey somu, tað sigur seg sjálvt. Men tann verðin, sum børnini skulu fyrihalda seg til, broytist jú øgiliga nógv allatíðina, ha?"





*Nýggi maðurin (Nouvel Homme) á stórari lýsing í París (mynd: Firouz Gaini)*

Samstundis kemur fram, at páparnir viðhvørt kenna seg eitt sindur vilstar. Teir hava ringt við at finna sítt pláss í familjuni og aðrastaðni. So hóast páparnir kanska vóru minni nærverandi fyrr, og ofta høvdu eina harðari framferð, so var ongin ivi um hvønn leiklut, ið teir høvdu í familjuni og samfelagnum. Pápin hevði onki at prógva. Kanningin vísir eisini, at páparnir hava ein ómetaliga stóran leiklut í lívinum hjá børnunum, hóast hetta sjáldan verður nevnt í kjaki um familjur og uppaling – burtursæð frá tá børnini verða spurd.

## Samanumtikið

Føroyska samfelagið er broytt nógv seinastu árini, og tað eru fleiri mátar at vera „modernaður" maður uppá í dag. Tað ber ikki til at siga, at „nýggi" pápin hevur avloyst tann føroyska pápan, ið vit høvdu frammanundan. Teir eru báðir partur av nútíðarsamfelagnum, og ofta eru báðir at finna í sama persóni. Teir skifta bleæur, áðrenn teir fara á fjall, og skifta bildekkini, innan teir fara til foreldrafund, og tað fungerar sum heild rættiliga væl.

### Um høvundan

Firouz Gaini er professari í antropologi á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Hann hevur skrivað vísindaligar greinir og bøkur um ungdóm, kyn, samleika og oyggjasamfeløg. Hann er fyrrverandi formaður í Føroya Fróðskaparfelag.

### Bókmentir:

Gaini, F. 2020: *'He understands me in a different way than others do': Faroese Teenagers' Narratives on Fatherhood, Masculinity, and Family Life.* Í tíðarritinum *Suomen Antropologi* nr. 45 (2).

### Brot úr samrøðu

Pápi: „Hann [pápin] hevur so nógvar leiklutir. Leikluturin er ræðuliga breiður. Tí tú skalt bæði vera hesin her ultra-macho-pápin fyri syninirnar hjá tær og alt hetta her, og vera har fyri makan hjá tær…samstundis við at tú skalt vera eymur og bleytur og kjerligur og alt tað sum er í hinum spektrinum. Og tú skal gera allar hesar her óinterressantu dagligu húsligu uppgávurnar, vaska gólv og vaska wc og alt…samstundis við at tú skal vera ímyndin av hesum her macho-pápanum. Ella hesum her perfekta pápanum. Tað kann gott vera nokk so ringt at vita, hvar man flýtur og hvussu man skal vera allatíðina. Tað trúgvi eg kann vera nokk so frustrerandi og strævið viðhvørt. Heilt sikkurt… Uppá ein máta var tað kanska simplari fyrr. Men eg trúgvi eisini at børnini eru ríkari í dag, tí tey hava nógv meira nærveru við sín pápa og páparnir eru meira inni í øllum. So eg trúgvi tað er til fyrimunar fyri børnini, tað haldi eg…"

# TÁ IÐ ALDURNAR BRÓTA

## Hvussu laksur livir og trívist á harðbalnum aliøkjum



**Ása Johannesen**
asajoh@fiskaaling.fo
Atferðarvistfrøðingur
Ph.d. Fiskaaling

Alivinnan er í støðugari menning fyri at framleiða meira fisk. Tað er ikki so løgið, tí eftirspurningurin er stórur, og prísirnir góðir. Hesin støðugi vøkstur í framleiðsluni leggur tó trýst á fiskin, sum má liva í størri og størri aliringum. Eisini verður laksurin nógvastaðni fluttur longri og longri út á firðirnar fyri at økja um útskiftingina av sjógvi og sleppa undan laksalús. Laksurin skal tí bæði orka at svimja í hørðum ráki og eisini duga at hava við stóra aldu at gera. Serliga kann aldan vera ring at hava við at gera. Hon kemur, tá ið tú minst væntar tað, og ikki ber til at flyta alibrúkið í einari knappari vending. Tískil hava hendingar verið ymsastaðni í landinum, har nógvur laksur er deyður orsakað av aldu.

### Flyta út á harðbalin øki

Sum sagt er tørvur á størri og størri laksaframleiðslu. Hetta er, tí fólki tørvar mat, og fiskur, bæði veiddur og aldur fiskur, er sera føðslugóður og hevur lutfalsliga nógv minni árin á náttúruna enn kjøt. Tískil kunnu vit vera errin av at framleiða allan henda góða matin í Føroyum. Alt er tó ikki so ljósareytt. Villu fiskastovnarnir eru fyri tað mesta fult troyttir ella ovurtroyttir, so um vit skulu halda áfram at eta meira fisk, so mugu vit ala meira fisk (Mynd 1).




*Mynd 1*: *Nøgdin av fiskavørum framleidd kring heimin í livandi vekt.*




***Mynd 2****: Ein aliringur við flótikraga, søkkringi og vekt í botninum.*

Firðirnir, har laksur vanliga verður aldur, egna seg væl til aling. Hetta er, tí teir verja fyri stórari aldu og hørðum ráki, soleiðis at útgerðin heldur, og fiskurin trívist. Friðarligu umstøðurnar eru tó avmarkandi fyri alingina, tí tað merkir eisini, at útskiftingin av sjógvi er lægri, og at dálking frá alingini verður liggjandi nærhendis brúkinum. Tískil er neyðugt at avmarka nøgdina av fiski, sum kann vera í einum alibrúki, sum liggur inni á einum fjørði.

Spurningurin er so, hvat vit skulu gera, tá ið allir alifirðir eru fullir av laksi. Seinastu árini eru alarar farnir at flyta síni alibrúk longri út á firðirnar, har rákið er harðari, og aldan størri. Á hesum støðum verður skarn og annað tynt út av harða rákinum, og botnurin fær nýggjan sjógv niður, tá alda er. Tí ber betur til at hava nógvan fisk, uttan at nærumhvørvið verður dálkað.

Somuleiðis er eisini eitt sindur lættari at hava við laksalýs at gera, um alibrúkið ikki liggur so, at tað smittar seg sjálvt. Laksalús er sníkur, sum býr á laksi meginpartin av lívinum og etur burturav slipu og skræðu. Hon gýtir eggjastreingir, sum klekjast til smáar lýs, sum reka við streyminum, til tær blíva eitt sindur størri og kunnu seta seg á laks. Tískil kann lúsin frá einum alibrúki enda við at klekja lítlar lýs, sum ikki skolast burtur, og seta seg á laks frá sama alibrúki, um útskiftingin av sjógvi ikki er nóg góð.

### Alda og rák avbjóðandi fyri útgerðina

Tá ið vit tosa um aliútgerð, tosa vit um aliringar, trossar og akker, sum halda teimum uppá pláss, umframt fóðurflakan og alt annað, sum verður koyrt á sjógv fyri at ala. Ein aliringur er sera liðiligur. Kragin ovast er gjørdur úr plastikkrørum, og í hann er fest ein rund nót við keyluskapaðum botni, sum niðast við á grunninum verður hildin niðri av einum søkkringi (Mynd 2).

Av tí at aliringurin og nótin eru liðilig, kunnu tey laga seg eftir umstøðunum. Nógv skal til, áðrenn ringurin brotnar, ella nótin skrædnar. Av tí at kragin ovast flýtur, so fer ringurin eisini upp og niður við alduni. Tað, sum kann henda, er, at um rákið verður ov hart, so skumpast nótin til viks og samstundis eisini uppeftir.

Ávísar hendingar hava verið í alingini, har stór alda hevur havt við sær aldugjørt rák („rip current“), og har hetta rákið hevur verið so ógvusligt, at nótin í aliringinum kroystist næstan heilt saman uppi við vatnskorpuna. Tá slíkt hendir, kann laksurin koma í ta vanlukkuligu støðu, at rúm ikki er fyri honum í aliringinum. Tískil verður stórur dentur lagdur á at sleppa undan slíkum støðum við at gera gjølligar kanningar av aliøkjum, áðrenn alingin byrjar. Harumframt er aldan, sum nevnt, ring at rokna út, og hon kann koma, har ein als ikki væntar tað.

### Laksurin lagar seg til rákið

Tá ið útgerðin er gjørd til at halda til umstøðurnar, er tað næstan so, at alt er gott. Laksur orkar sera væl at svimja, men hann tolir ikki óavmarkaðan streym.




***Mynd 3**: Hvussu laksur stendur og andøvur í einum aliringi, tá ið tað rekur hart.*

Sum tummilsregla verða kropslongdir hjá laksinum brúktar til at meta um, hvørt hann orkar at svimja ímóti streyminum. Ein laksur, sum er 20 sentimetrar langur, eigur at orka væl at svimja sína egnu kropslongd um sekundið, tvs 20 cm/s. Er streymurin í einum styttri tíðarskeiði, kann laksurin orka upp til hálva aðru kropslongd um sekundi, t.v.s. í hesum førinum 30 cm/s. Av tí at svimjiorkan hjá laksinum er so tengd at støddini, so orkar hann at svimja í harðari ráki, so hvørt sum hann veksur.

Fyri á lættasta hátt at meta um, hvørt laksur orkar at svimja í ávísum ráki, og av tí at hetta er tengt at støddini á laksinum, verður rák ofta lýst í kropslongdum um sekundið, og svarar hetta tá til longdina á laksinum, sum svimur í lýsta rákinum.

Í summum alibrúkum verður laksurin fyrst settur út á eitt øki við spakum ráki, og síðani, tá fiskurin er vaksin nakað, verður hann fluttur á eitt stað við harðari ráki. Á henda hátt ber til at verja laksin frá ov hørðum ráki og eisini tryggja, at varða økið ikki verður ov illa dálkað.

Laksur, sum er í sjógvi, sum rekur minni enn eina kropslongd um sekundi, svimur ofta runt í ringinum í torvum. Á summum alibrúkum svimur fiskurin í ring uttast í ringinum, meðan aðrastaðni ferðast hann meira frítt runt og heldur seg kanska meira til eitt øki í ringinum.

Tá rákið veksur upp um eina kropslongd um sekundið, so velur laksurin ofta at andøva ímóti rákinum. Tá er tað mesta av fiskinum „fremst" í ringinum, t.v.s. har, sum sjógvurin rekur inn í ringin, soleiðis at laksurin svimur við høvdinum vendum ímóti nótini (Mynd 3). Summir laksar enda aftast í ringinum við stertinum út ímóti nótini. Har standa teir so í frið, inntil teir aftur fara at svimja frítt runt í ringinum, tá rákið minkar ímóti kyrrindum.

## Aldan er nakað heilt annað

Fyri fiskin upplivist aldan sum, at sjógvurin melur í ring sum eitt nokkso skjótt parisarahjól. Tað vil siga, at laksurin fyrst verður drigin í eina ætt, so skumpaður uppeftir, síðani drigin í mótsattu ætt og til endans skumpaður niður, fyri síðani at byrja umaftur (Mynd 4). Aldurnar eru ymiskar í stødd, og ofta eru stórar og smáar aldur blandaðar í ein vavgreyt, so rørslan ikki er serliga reglulig. Tað er ikki heilt greitt hví, men hetta dámar laksinum onki serligt.

Tíbetur ber væl til at stinga av niðureftir, har rørslurnar á alduni eru minni – ella tað ber til, har pláss er fyri tí. Í einum aliringi er ein botnur, og longri niður enn tað sleppur laksurin ikki. Aldur eru soleiðis, at um langt er millum topparnar (lang perioda), so er flutningurin av sjógvi aftur og fram størri, og henda aftur og fram rørslan stingur longri niður í sjógvin. Henda alda er vanliga skapt úti á havinum, meðan aldur við stuttari periodu ofta blíva til nærri við land, tá ódnarveður er.

Aldurnar, sum standast av ódnarveðri nærhendis landi, eru ógvusligari orsakað av bæði hægri alduhædd (so upp og niður rørslan er stór), og tí tað er stutt millum topparnar, so sjógvurin gerst sera rokaligur at vera í.

Fyri tað mesta eru aldurnar við alibrúkini tó nóg smáar til, at tær ikki stinga serliga djúpt niður í sjógvin, so í flestu førum ber til hjá laksinum at kava nóg djúpt til, at hann sleppur undan tí mesta av alduni.

Í summum førum kemur eitt ódnarveður samstundis, sum harðasti streymur er. Tá kann rákið lyfta botnin á ringinum, samstundis sum fiskurin vil standa og andøva ímóti streyminum, meðan aldan avmarkar plássið uppeftir. Í hesum førum hevur laksurin rættiliga lítið rásarúm og fáar møguleikar fyri at velja sær eitt annað stað at vera.

Tíbetur er tað eisini so, at ringurin eisini flytur seg við alduni. Hetta merkir, at nótin verður skumpað á sama hátt sum laksurin, tá ein alda rakar. Tískil er laksurin í minni vanda fyri at renna á nótina, enn hann hevði verið, um nótin stóð still, meðan aldan fór ígjøgnum hana.

Tó er aliringurin stórur, og seinkingar eru í rørsluni, so nakað av sjógvi ferðast hóast alt ígjøgnum nótina, sum laksurin má tryggja sær, at hann ikki fer við. Tískil stendur laksur eisini ofta nakað longri frá nótini, tá alda er, enn tá ongin alda er.

## Tann bjarta framtíðin

Í løtuni leita alifeløgini eftir tí besta mátanum at ala laks úti á uppaftur harðbalnari økjum ella enntá úti á opnum havi. Til hetta krevst sjálvandi útgerð, ið tolir enn størri aldur.

Somuleiðis skal útgerðin halda til hart rák og til ódnarveður við blandaðari aldu. Fyri tað fyrsta skal onki brotna, fyri tað næsta skal tað bera til at arbeiða á brúkinum, og fyri tað triðja skal laksurin trívast. Vit hava ikki alt laks á støðum við høgari aldu, sum eisini hevur drúgva periodu.

Tað kann vera, at laksurin má hava møguleika fyri at kava longri niður, enn vit eru von við. Tað kann eisini vera, at útgerðin ikki livir líka væl við alduni, so laksurin noyðist at fara longri inn frá síðunum fyri at ikki renna á. Tískil er skilabest at byrja við at kanna viðurskiftini í mun til aldu og rák sera væl, áðrenn fiskur verður settur út.

Alibrúk á harðbalnum økjum eru ofta størri enn vanligu ringarnir, vit kenna, og ofta eisini skapað á annan hátt, til dømis sum eitt skip. Av tí sama verður ofta eisini roknað við, at tað ber til at hava sera nógvan fisk í hvørjari eind. Tó er neyðugt at rokna brúkiligu støddina á eindini til at vera minni enn veruligu støddina, so ein ikki setur ov nógvan fisk út. Hetta er serliga galdandi fyrstu og kanska aðru ferð, eindin verður brúkt, soleiðis at tað ber til at gera eina meting um, hvussu nógv av rúminum, laksurin fær verið í.

Um laksurin má burtur frá síðunum og niður undan alduni, so er als ikki so nógv rúm, sum har sær út til at vera. Somuleiðis er neyðugt at taka hædd fyri vatngóðsku, tí serliga um laksurin trokast saman ávís støð í eindini, so er eisini vandi fyri, at vatngóðskan júst har minkar.

Alt í alt dugir laksur sera væl at klára seg í bæði streymi og aldu. Um vit duga væl at hýsa laksinum, so eiga vit at kunna ala sera nógvan laks á burðardyggan hátt í komandi tíðum.


**Bókmentir:**

Greinin byggir á hesar vísindaligu greinarnar:

- Johannesen Á, Patursson Ø, Kristmundsson J, Dam SP, Mulelid M, Klebert P (2022) Waves and currents decrease the available space in a salmon cage. PLoS ONE 17(2): e0263850. https://doi.org/10.1371/journal.pone.0263850
- Johannesen Á, Patursson Ø, Kristmundsson J, Dam SP, Klebert P (2020) How caged salmon respond to waves depends on time of day and currents. PeerJ 8:e9313 https://doi.org/10.7717/peerj.9313


*Aling á Sandsvág. Mynd: Ólavur Frederiksen*





***Mynd 4**: Hvussu aldan flytur laksin í sjónum, tá ið hon fer framvið*

# VATNSPÍRI – EIN FORN PLANTA Í NÓLSOY

*Føroysk flora* (2000) skrivar um vanligan vatnspíra (*Hippuris vulgaris*): „Bert funnin í eini tjørn í Nólsoy, hagar hon er sett út av fólki“. Av tí, at tað tykist løgið at nevna eina plantu, sum einans veksur í einum staði,„vanliga“, havi eg valt einans at brúka heitið „vatnspíri“.



*Vatnspíri í einari uml. 5 x 15 m tjørn í Nólsoy 16. juli 2015*



**Jens-Kjeld Jensen**
nolsoy@gmail.com
Heiðursdoktari á
Fróðskaparsetri Føroya

Í 1922 skriva Rasmus Rasmussen og Knud Jessen eina grein við heitinum *Et Profil gennem en Tørvemose*. Her er ein nógv stytt týðing av sera áhugaverdu greinini: „Tá grivið varð út fyri grundini til Margarinfabrikkina (Thorshavn's Mælkeforsyning & Margarinefabrik) í Tórsgøtu í Havn á vári 1921 og fyri Sjómansheiminum í somu gøtu á heysti, hevði Rasmus Rasmussen høvi at granska tey beru jarðløgini. Hann sendi inn ymisk sýni av jarðløgunum til plantufrøðiliga savnið á universitetinum í Keypmannahavn, sum sendi málið víðari til Knud Jessen, og soleiðis kom samband í lag millum rithøvundarnar til hesa ritgerðina.

Í nevnda útgrevstri til Margarinfabrikkina vísti tað seg, at frá lítlu innastu víkini í Vestaruvág gongur ein kluft í basaltinum nakrar hundrað metrar í ein útnyrðing.

Kluftin hevur verið ein av teimum í føroyska basaltinum vanligu kluftunum, nevndar gjótur; í ístíðini hevur jøkulin máað gjótuna størri, meðan hann flutti seg í ein landsynning.

Í eftiristíðini er torv uppstaðið í lítla smala dalinum, har rendurnar, áðrenn torvið uppstóð, vóru uml. 8 m hægri enn botnurin. Í botninum á gjótuni undir Tórsgøtu lá eitt 6 cm tjúkt lag av sandi, sum líktist fjørusandi, og sum var undirlag undir tí 2 m tjúkka torvlagnum.

Í niðaru torvløgunum vórðu funnir fleiri enn hálvtriðhundrað av teimum sermerktu fruktsteinunum frá vatnspíra (*Hippuris vulgaris*). Plantan vaks her, meðan upphavið til niðara evjukenda lagið varð til."

## Jóannes Rasmussen greiðir frá

Jóannes Rasmussen skrivar í Varðanum 1949 um Vatnspíra: „Hon er vanlig planta í øllum grannalondum okkara og í meginlondunum, men í Føroyum er hon higartil ongantíð funnin omaná.

Tvær reisur fyrr er hon funnin í mógvi í Føroyum. Tá grivið varð fyri grundini til Margarinuvirkið í Vágsbotni í Havn í 1921, varð hon funnin í niðastu móflógv har, og í 1926 var hon funnin í mónum á Malarenda í Nólsoy. Í Skálavík var hon so funnin í 1945, og har var almikil frukt til av henni í evjuflónni.

– Spurningurin er nú, hví vatnsspíri ikki trívst hjá okkum longur, hon hevur vaksið her fyrr, og hon krevur ikki øðrvísi lívsvilkor enn mangar aðrar plantur, ið enn eru vanligar í Føroyum. Jessen ber við henda spurning í *Et Profil gennem en Tørvemose paa Færøerne*. Hann heldur, at plantan altíð man hava verið sjáldsom í Føroyum, og at hon ikki sá sær nakran útveg at flyta í onnur vøtn ella aðrar tjarnir, tá tey vøtn, hon vaks í, voru tilgrógvin.

– Væl kann tað vera, at soleiðis hevur gingist, men annað er, um vatnspíri var so sjáldsom. Tá Jessen nevnir hetta, var hon bert funnin í Vágsbotni í Havn. Síðan er hon, sum nevnt, funnin í mónum bæði í Nólsoy og á Sandoynni, og tað týður ikki á, at hon hevur verið so sjáldsom. Hesin spurningur eigur tí at verða havdur í huga við framtíðar rannsóknir. Afturat eigur at verða mint á, at um eingin enn hevur borið eyga við hesa plantu í Føroyum, so er tað sjálvandi ikki heilt avgjørt, at hon ikki kortini er til onkustaðni."

## Leivdir av fornum gróðri

Her var Jóannes Rasmussen á púra rættari leið, tí 2. august 1960 fann Søren Ødum vatnspíra, tá hann saman við nøkrum ungum donskum plantufrøðilesandi var í Nólsoy í sambandi við stóru plantufrøðiligu kanningina undir leiðslu av Kjeld Hansen. Seinni hava fleiri hildið, at vatnspíri er settur út í Nólsoy; men sambært dagbókini hjá Jógvani Thomsen helt Niels á Botni, at hann er leivdir av fornum gróðri.

Í 1975 var Jógvan Thomsen sum vant og tosaði við Niels á Botni um ymiskt í náttúruni. Niels segði tá við Jógvan, sum so hevur skrivað í dagbók sína: „R. Rasmussen sigur í F. Floru, at vatnspíri er útdeyður. Men Niels fann hann í Steinavatni. Lærdir menn vildu vera við, at plantan kom í vatnið saman við stórum mannagrasi (*Glyceria maxima*), sum Niels fekk úr Roskilde og gróðursetti í Steinavatni; men Niels sigur at hon vaks í vatninum áðrenn tað. Tó kann tað vera hent fyrr, tí tá fýrurin varð bygdur í 1892-93, vóru tingini pakkað inn í hálm o.a. Hesin hálmur bleiv nýttur til dunnurnar, ið havdar vóru í Steinavatni, og kann tá vatnspíri vera komin í vatnið. Mest sannlíkt er, at plantan hevur verið í vatninum áðrenn tað."

## Spjaðist ikki lættliga

Vatnspíri fjølgast bæði við rótskotum og fræum, sum eru smá og rund, so tey spjaðast ikki lættliga. Umframt at fólk kann flyta tey frá vatni til vatn, kunnu fuglar so sum ritur og dunnur flyta fræini.

Hóast eingin kann siga nakað við fullkomnari vissu, so bendir alt á, at vatnspíri er yvirsæddur í Nólsoy og hevur vaksið har í næstan 11.000 ár.



*Her síggjast fruktsteinarnir á vatnspíra (Hippuris vulgaris).*




*Tórsgøta 2021*

**Bókmentir:**

Jessen, Knud og R. Rasmussen, 1922: Et Profil gennem en Tørvemose paa Færøerne. Danmarks geologiske Undersøgelse. IV. Række. Bd. 1. Nr. 13. København. I Kommission hos C. A. Reitzel. Andelsbogtrykkeriet i Odense. Pp. 1-32

Jóhansen, Jóhannes, 2000. Føroysk flora. Ritstj. eds. Fosaa, Anna Maria & Rasmussen, Sigga. Føroya Skúlabókagrunnur. Pp. 1-485

Rasmussen, Jóannes, 1948: Nøkur orð um fornan gróður í Føroyum. – Varðin 26 (1949): 109-116, 2 md. Tórshavn.

Rasmussen, R. 1970 (endurprent av 2. útg. 1952): Føroya Flora. 2. útgáva. Skúlabókagrunnur Løgtingsins. Pp. I-XXVIII, 1-232.

# RINGUR KOSTUR OYÐILEGÐI HEILSU *føroyinga*



**Lív Arge Simonsen**
livargesimonsen@gmail.com
MA í søgu og stjórnmálafrøði
Søguskyn

Broytingartíðirnar í seinnu helvt av 1800-talinum høvdu við sær ringar matvanar, og tað gekk aftur á hondina heilsuliga hjá nógvum føroyingum. Seiggið í fólkinum minkaði. Serliga kvinnurnar høvdu ikki góðan trivnað, men vóru bleikar og illa fyri. Tørvur var á upplýsing um føðslu, og ynski vóru frammi um at fáa vent gongdini. Fleiri royndir vórðu gjørdar at seta á stovn ein føroyskan húshaldsskúla, sum skuldi geva frálæru í góðum kosti. Undirtøka fekst tó ikki fyri tí her á landi, og tískil tóku onnur ábyrgd av hesum máli.



***Mynd 1**. Málningur av kvinnu í føroyskum klæðum, ið stendur við køksborðið og hyggur út. Ókent listafólk. (Mynd: lauritz.com)*

**Mynd 3.** *Postkort av matgerðarstovuni á húshaldskúlanum í Sorø fyrst í 1900. (Mynd: fotohistorie.com)*




**Mynd 2.** *Jóannes Patursson talar á fólkafundi í 1920-árunum. Í 1899 hevði hann á fólkafundi á Hvalvíksskarði umrøtt, at fólkið ikki hevði kunnleika um, hvørji evni kroppinum tørvar til bestu og bíligastu føði. (Mynd: Tjóðsavnið)*

Tíðina um aldaskiftið 1900 mentist føroyska samfelagið og gekk nýggjar leiðir. Tað var í seinnu helvt av 1800-talinum, at nógvir batar fóru fram í samfelagnum. Tá ið kongligi einahandilin varð avtikin í 1856, og fríhandilin gjørdist veruleiki, komu fleiri handilspláss og vinnugreinar. Alt fleiri húski livdu av inntøkum frá fiskiskapi, og onnur fingu størv í handilsvinnuni. Hetta ávirkaði vegin, ið samfelagið mentist. Um ár 1900 var tað vorðið liviligari hjá fólki, og fátækadømið minkaði. Broytingar sóust eisini í lívshátti. Í hesum sambandi vóru læknar vorðnir varugir við, at kosturin eisini var broyttur, og teir hildu tað ikki bara vera til tað betra.



## Lívshátturin í Føroyum um ár 1900

Andreas Boeg var amtslækni í Føroyum 1890-1900. Hann skrivaði fleiri greinir og ritgerðir um heilsu føroyinga. Hann gjørdi sær eitt nú niðurstøður um heilsu og lívshátt føroyinga í doktararitgerðini „Et epidemiologisk Bidrag til Lungeftisens Ætiologi“ (1902). Men Boeg vendi sær eisini til vanliga lesaran. Í 1904 skrivaði hann greinina „Om færingen og hans Levevis“, ið varð prentað í Atlanten, ið var limablað hjá áhugafelagnum De Danske Atlanterhavsøer. Greinin varð umrødd í Tingakrossi og í Oyggjunum; Tingakrossur rósti greinini og prentaði hana í blaðnum tann 13. desember 1905. Boeg umrøðir, at nógvar samfelagsbroytingar, ið hava verið seinastu árini, eru til stóran bata. Hugsan hansara var, at seinastu árini fyri aldaskiftið batnaðu lívskorini hjá fólki. Meira marglæti kemur til landið, og kunnleikin til danskar matsiðir gerst meira útbreiddur nógvastaðni í Føroyum. Í hesum sambandi greiðir Boeg frá seinastu ferðini, ið hann var í Føroyum. Hetta var á sumri ár 1900. Tá legðist hann veðurfastur úti í Mykinesi. Av greinini skilst, at sjálvt á útoyggj vóru vertsfólk, sum dugdu at borðreiða við donskum rættum fyri útlendskum gestum:

*„En vis Luksus sporedes … paa min brave Værts Bord maatte jeg savne det vindtørrede Faarelaar. Der blev budt mig Konserves som Kronehummer og bedste Lysekil Appetitsild. Til Middag Fiskefilet med Kapers, grilleret Høne og til Dessert Bondepige med Slør – alt fortrinligt tillavet. En Menu, jeg indrømmer det, som kun var for Gæstens Skyld. Men paa Handelspladserne var dansk Kokken i færøske Huse ingen Raritet. Dansk Snit paa Klædedragten endnu mindre* (Boeg, 312, 1904)*.“*

Men í somu grein umrøðir hann eisini, at heilsan hjá føroyingum er versnað. Í 1880-árunum var mótstøðuføri føroyinga viknað, og tuberklarnir vóru farnir at ganga. Orsøkin var brennivín og hungur (Boeg, 311, 1904). Tíðin var merkt av fátækadømi, og í summum bygdum livdu fólk mest av eplum og turrum fiski. Um sama mundið var rúsdrekkanýtslan eisini vorðin ein trupulleiki. Kosturin var eisini broyttur til tað verra. Longu eftir fríhandilin hevði føroyingurin broytt matarhald. Fólk vóru farin at eta meira av gróni, og nýtslan av kaffi var økt:

*„Ogsaa Færingens Kost blev en anden. Hidtil havde denne aldeles overvejende bestaaet i animalske Næringsmidler, ferskt, saltet eller vindtørret Kød af Hval, Faar, Fugl eller Fisk. Kun lidt af Brød, men saa meget mere Spæk og Tælle. Desforuden Smør-, Ost og Mælk. Men efter Frihandelens Indførelse begyndte Færingerne at gøre ikke blot den Fisk, de fangede, men ogsaa deres Faar, deres Smør, Ost og Mælk i Penge, og der købtes, som der købes den Dag i Dag, store Kvanta Kaffe, Hvedebrød og Kager* (Boeg, 310, 1904).“

## Tørvur var á upplýsing um føðslu

Tíðina um aldaskiftið var enn eingin stovnur ella skúli í samfelagnum, ið kundi upplýsa fólk um føðsluviðurskifti. Tað vóru ávísir bólkar í samfelagnum, ið mettu, at vantandi upplýsingin var ein trupulleiki. Hetta vóru m.a. tey, sum varðaðu av landbúnaðinum tá á døgum. Í tjóðskapartíðini varð skipað fyri fyrstu fólkafundunum. Á fundunum vórðu almenn mál tikin upp og umrødd. Annan hvítusunnudag í 1899 varð sølan av rúsdrekka umrødd á einum fólkafundi, ið varð hildin á Hvalvíksskarði. Har møttu uml. 250 fólk (Fuglaframi, 3, 1899). Í røðu síni umrøddi Jóannes Patursson hvørjar aðrar handilsvørur, ið hann metti vera ringar fyri heilsuna. Í Føringatíðindum tann 15. juni 1899 verður sagt soleiðis frá røðu Jóannesar:

*„Jóannes bóndi í Kirkjubø helt við teimum fyrru talarum viðvíkjandi tí skaða og spelli, ið stendst av rúsdrekkanum, men hann helt, at mong onnur sløg av handilsvaru vóru óhent og til líka stórt peningaspell og eisini til heilsuspell. Hann nevndi kaffi og fínt mjøl og fleiri onnur sløg, sum antin vóru skaðilig í seg sjálvt ella voldi peninga og heilsuspell, tí at fólkið ikki hevði slíkan kunnskap um, hvat evnir kroppurin krevur til bestu og bíligastu føði.“* (Føringatíðindi, 12, 1899)

Rasmus Effersøe, búfrøðingur, var eisini til staðar á fundinum, og hann tók undir við hesum sjónarmiðum. Hann vísti á, at fólkið var vorðið ótreyst, t.e. at eingin stirðil var í teimum. Orsøkin var tann nógvi útvatnaði matur, ið nú varð brúktur. Hann nevndi síðani, at føroyingar ikki fingu nóg stórt gagn av stórhvalatvøstinum, tí at nøgdin av tvøstinum nú varð saltað og harvið gjørd til eitt minni gagnligt føðievni.



**Mynd 4.** *Súsanna Helena Patursson gjørdist forsprákari fyri landhúshaldsskúla í Føroyum. (Mynd: Tjóðsavnið)*

## Líknandi støða var í grannalondunum

Støðan við ringum kosti og veikleika í fólkinum var tann sama í grannalondunum. Tí tók eitt rák seg upp, har roynt varð at bøta um støðuna við at geva kvinnum frálæru í húshaldi. Rákið byrjaði í Bretlandi, har føðslu-



***Mynd 6.*** *Embætisstova. (Mynd:Tjóðsavnið)*

kanningar høvdu víst, at í mongum arbeiðarabýarpørtum vóru máltíðir í høvuðsheitinum settar saman av kaffi og hveitibakstri. Húsmøður í slíkum býarpørtum høvdu eina stóra arbeiðsbyrðu og sera avmarkaða vitan um kost og heilsugóða føðslu. Fyri at betra um støðuna gjørdist skúlakøkur lærugrein (Petri & Kragelund, 21, 1980). Rákið breiddi seg til onnur lond. Í Danmark fingu fyrstu háskúlanæmingar, skúlagentur og kvinnur, sum lósu til lærara, undirvísing í húshaldi tíðina um aldaskiftið.

## Danskar kvinnur kundu fara á húshaldsskúla

Í Danmark vórðu eisini húshaldsskúlar settir á stovn, har kvinnur kundu læra at gera heilsugóðan og føðsluríkan kost. Millum 1895 og 1915 vórðu 20 húshaldsskúlar settir á stovn. Grundarlagið undir at seta skúlarnar á stovn var ein nýggj fatan av, at høvuðsstarvsøkið hjá kvinnum var í einum húshaldi annaðhvørt sum húsmóðir ella sum lønt tænastufólk. Húshald hevði ikki fyrr enn seint í 1800-talinum verið fatað sum eitt yrki á sama stigi sum mannlig yrki, sum kravdi skúlar og útbúgving. Húshaldsskúlar og skeið vórðu stovnað fyri at arbeiða fram ímóti hesum máli (Andreasen & Rasmussen, 84, 2020).

## Landbúnaðurin hevði tørv á húshaldsskúla (1900-1901)

Hetta rákið kom eisini til Føroya. Fyrst í 1900-talinum kom húshaldsskúlamálið higar, men her var ynskið fyrst og fremst at fáa ein sonevndan landhúshaldskúla. Tá á døgum hevði føroyski landbúnaðurin stóran tørv á ábót, og tí løgdu í ár 1900 Jóannes Patursson og Mads Andreas Winther-Lützen, landbúnaðarráðgevi, eina áheitan fram fyri løgtingið um at fáa ein sameindan búnaðarskúla í Kirkjubø fyri gentur og dreingir settan á stovn (Løgtingstíðindi, 68, 1900). Gentuskúlin skuldi hava matgerðarstovu, og ein húshaldslærarinna skuldi setast í starv. Í 1901 verður í einum fylgiskjali ein búnaðar- og húshaldsskúli umrøddur. Har stendur eisini, at húshaldsnæmingar skuldu fáa undirvísing í vanligari húshaldslæru, djórarøkt, meiarí, heimavirki og roknskaparførslu. Teir skuldu harumframt læra at skilja týdningarmestu meginreglurnar viðvíkjandi húshaldsevnafrøði og føðsluvirkisfrøði (Løgtingstíðindi, 44, 1901). Í komandi árum varð arbeitt við málinum, tó uttan stórvegis úrslit.

## Heilsugott rák kom so smátt til Føroya

Í hesum tíðarskeiði broyttist lívshátturin og umstøðurnar hjá kvinnum. Hetta sæst aftur í tíðarritinum Oyggjunum, har húshaldsskúlamálið og heilsustøðan hjá kvinnum verður umrødd.

Súsanna Helena Patursson var frá 1905 til 1908 ritstjóri á tíðarritinum Oyggjunum, sum í høvuðsheitinum umrøddi viðurskifti hjá kvinnum í samfelagnum. Evni sum eitt nú kostur, útbúgving, barnauppaling og almenn heilsuviðurskifti vórðu viðgjørd í tíðarritinum. Hon legði eisini dent á, hvat kvinnur áttu at stremba eftir. Hetta tíðarskeið gav hon eisini út fyrstu føroysku kókibókina. Í bókini „Matreglur fyri hvørt hús" (1907) stóðu tilsamans 160 ymiskar matuppskriftir til føroyska húshaldið. Her varð eisini dentur lagdur á heilsugóðan kost. Á fyrstu síðu í bókini endurgav hon norðmannin dr. Olav Johan-Olsen Sopp, ið gav bøkur út um kost og mælti fólki til at eta og velta grønmeti. Sambært kókibókini bar til at velta blómkál, knútakál, grønkál, reyðkál, spískál, hvítkálshøvd, reyðrøtur og grønar ertrar í kálgarðinum. – Súsanna Helena var systir Jóannes og Sverra Patursson. Eisini brøður hennara gjørdu nógv vart við hetta mál.

## Uppgávan hjá kvinnuni var at gera heilsugóðan kost til húskið

Í 1904 hevði Sverre Patursson skrivað eina grein í norska kvinnublaðnum Husmoderen, ið nevnist „Den færøiske kvinde". Endamálið við greinina var at fáa føroyskar kvinnur at íðka ymist uttandura, tí høvundurin helt, at tær høvdu ov ringa heilsu. Tær vóru bleikar og klænar eins og kvinnur úr einum stórbýi. Sverre Patursson helt orsøkina vera, at tær vóru ov nógv innandura. Greinin fekk ringa móttøku millum føroyskar kvinnur, ið helst hildu seg vera fyri ov hørðum atfinningum. Í september 1905 var ein verjurøða fyri greinina prentað í Oyggjunum. Í greinini „Hví er Føroya kvinnan bleik og kraftaleys?" verður m.a. mælt til, at kvinnur skuldu lært seg heilsugóða matgerð. Hetta er ein uppgáva, ið tær áttu at røkt í samfelagnum:

*„Hevði so meginparturin av teimum, sum bæði summar og vetur, dagin út, sita og seyma, tveitt nál og tráð og í staðin fingið sær kunnleika í at kóka mat – vit meina ikki franska sauce, samanvevjing, koyr í, men góðan, sunnan mat, sum nørir um heilsuna, styrkir arbeiðshugan og frískar sinnið, og síðani elvdi nógvar aðrar til at læra kunstin frá sær, – tá var eisini nógv vunnið. Tí hetta er ein av teimum fyrsti uppgávinum, sum framilig fólk (smá ella stór lond) nú á døgum leggja sær eina við. Vit kenna so mikið til tær føroysku gentirnar, at tær kunna, hvat tær vilja – tá ið tær vilja.*

*Vit tørvast so ómetuligt dygtigar kvinnur, sum kunna reka burtur nógv av kaffi – og heita[1] drekkaríinum, og í staðin fyri tað læra fólk at gera sunnan og neringsmiklan kost*" (Oyggjarnar, 1, 1905).

## Súsanna Helena gjørdist forsprákari fyri húshaldsskúlum (1906)

Um hetta mundið var saknur í Føroyum eftir frálæru í matgerð. Í september 1906 umrøddi Súsanna Helena í tíðarritinum, at bæði kvinnur og menn hava sent henni skriv og biðið hana „tala fyri", at húshaldsskúlar vórðu settir á stovn. Í hesum sambandi sigur Súsanna Helena seg vilja hava landhúshaldsskúlar, sum taka støði í heimligum viðurskiftum, har næmingar skulu læra at gera heilsugóðan, føðsluríkan kost úr føroyskum rávørum. Næmingar skulu læra roknskap og alt kvinnuyrki innandura, sum tørvur er á í einum góðum føroyskum húsi. Í hesum sambandi skulu næmingar læra plantulæru og djórarøkt. Barnakostur og barnarøkt skulu vera eitt høvuðsmál í frálæruni á landhúshaldsskúlunum. Tvær raskar og hugagóðar kvinnur, barnleysar einkjur ella ógiftar, sum einki hjástarv høvdu, skuldu standa fyri skúlanum. (Oyggjarnar, 1, 1906).

## Ein heimligur landshúshaldsskúli, ið hóskaði til føroysk viðurskifti (1906)

Súsanna Helena var sannførd um, at húshaldsskúlar eftir útlendskum mynstri ikki vóru hóskandi her á landi. Hetta var almenni hugburður blaðstjórans. Í mai 1906 hevði Súsanna Helena skrivað í grein í Oyggjunum „Mammur og døtir Matmøðrir og Arbeiðskonur", at her á landi hevði allar dagar verið saknur eftir góðum heimligum skúlum, sum skuldu alt okkum upp til upplýstar, arbeiðssamar og dugandi føroyingar, áðrenn vit lærdu siðir úr øðrum londum (Oyggjarnar, 1, 1906). Hetta sjónarmiðið gongur

[1] Í Oyggjunum nr. 17 prentaði blaðstjórin rættingina, at *heila* skuldi rættast til *heita*.

aftur, tá ið húshaldsskúlamálið verður umrøtt av øðrum kvinnum. Eitt dømi er úr Oyggjunum tann 19. desember 1906. Tann, ið skrivar, endar lesarabræv um húshaldsskúlar við at siga, at ein vælgrundaður, heimligur húshaldsskúli leingi hevur verið eitt stórt sakn i Føroyum (Oyggjarnar, 1906, 1).

## Máttloysi og mistrivnaður hevði fingið valdið í Føroyum (1907)

Lesarar hjá Oyggjunum fóru eisini at gera vart við, hví føroyingar høvdu tørv á húshaldsskúlum. Ein, ið skrivar í Oyggjunum, nevnir seg „Fljógv á útoy". Í oktober 1906 umrøðir „Fljógv á útoy" í lesarabrævinum „Til Føroya kvinnur", hvussu illa fólkið var afturfarið í kropsligum stimbri.

Tann 20. februar 1907 skrivar „Fljógv á útoy" enn eitt lesarabræv „Aftur húshaldsskúlin". Hetta lesarabræv er meira hvassorðað. Sambært brævinum máttu øll sanna, at húshaldsskúlamálið nú var fyri neyðini. Fólk tosaðu dúgliga um, hvussu lønin hjá monnum var vorðin væl betri, at húsini vóru stásilig, at fólk vóru væl klødd, og at tey høvdu rúmligt til matna. Men innandura var nógv skeivt og átaluvert. Um tú hugdi gjøllari eftir, sást tú, at konan ikki røkti seg og børnini á rættan hátt. Hugsanin hjá „Fljógv á útoy" er, at nútíðin við innfluttum handilsvørum er sera átaluverd:

*„Matgerðingin harmar meg títt, tí at høvuðskosturin, mangan, er … fint mjøl (ið dúglia verður keypt hýggjuskotið, tí varan trýtur ongastaðis), kaffi tíðliga og seint, kakur, te (biligt, uppfarga! skaðadrykkur! tí gott te fæst ikki í bygdahandli og einans hjá 2 keypmonnum í Havnini). Hvat stimbur skal koma av hesum íðuliga heita drekkaskvatli og hveitukosti – kannska tað skaðiligasta (tubbak) uppiimillum? Hví fellur tað unga fólkið í stórum fyri bróstsjúkuni? Hví gongur onnurhvør genta við magasári og bleiksjúku? Man ikki misbroti í mat og klædnað er høvuðsársakin har máttloysi og misstrivni hevur fingið valdi? Óivað. … Lat okkum fáa tann fyrsta húshalds- og uppfostringsskúlan – heldur hettar ár enn tað komandi – til ábøtur fyri tað kroppsliga stimbrið, ið vit høvdu fram um onnur fólk (ikki mannsævi síðan!) (Oyggjarnar, 3, 1907)"*

Hugsanin hjá fólki var, at ein húshaldsskúli kundi vent skeivu gongdini í samfelagnum. Hjá fólki tá á døgum kundu húshaldsskúlar tryggja eitt ávíst stig av almennari heilsu og vælferð í samfelagnum. Tað hevur helst verið ein trupulleiki, at mjøl og aðrar handilsvørur ofta vórðu goymdar ov leingi hjá handilsmanninum. Eitt dømi er úr Oyggjunum tann 18. juni 1908. Har verður speirekandi sipað til góðskuna á mjøli, kaffi, te o.s.fr., ið er til sølu í Havn.

## Bjóðaði næmingi eitt hálvt fríplass á skúlanum hjá Birgitte Berg Nielsen (1907)

Í Danmark var tað størsta kvinnufelagið, Dansk Kvindesamfund, sum hevði slóðað fyri, at undirvísing í húshaldi kom í lag. Hetta var eitt borgarligt kvinnufelag, sum stuðlaði kvinnusakini. Felagið hevði havt útbúgving á stevnuskránni, síðani tað varð stovnað í 1870-árunum. Birgitte Berg Nielsen var limur í felagnum, og hon var millum tær undangongukvinnur, sum slóðaðu fyri húshaldssmálinum. Í 1907 var hon frá almennari síðu útnevnd at hava umsjón við læruni á húshaldsskúlunum í Danmark. Í desember 1907 skilst, at Súsanna Helena Patursson hevur sett seg í samband við Birgitte Berg Nielsen, tí Súsanna Helena hevði sett sær fyri at stovna ein húshaldsskúla í heimbygdini. Í grein í Oyggjunum „So framt sum onkur góður maður" í des. 1907 skrivar Súsanna Helena, at hon fór at biðja løgtingið søkja um statsstuðul til ein rúmligan, men kostnaðarlítlan landhúshaldsskúlabygning av timbri. Av tí at hetta var eitt týdningarmikið landsmál, vónaði hon, at tað fór at fáa góða undirtøku og verða framt av løgtinginum. Í hesum sambandi vildi hon hava, at ein ung føroysk kvinna skuldi útbúgvast á skúlanum fyri húshaldsskúlalærarinnur hjá Birgitte Berg Nielsen í Frederiksberg. Skúlin lá tætt við stóra landbúnaðarskúlan á økinum. Útbúgvingin tók trý ár og kostaði vanliga 2000 kr., men Súsanna Helena bjóðaði næminginum eitt hálvt fríplass á skúlanum. Sambært Súsannu Helenu var Birgitte Berg Nielsen fegin um at hoyra, at føroyingar sjálvir vóru farnir at taka stig til skúlan, tí hon hevði í mong ár hugsað um, hvussu hon skuldi byrja ein húshaldsskúla í Føroyum (Oyggjarnar, 2, 1907).

## Meiriluti á løgtingi stuðlaði ikki húshaldsskúlum (1908-10)

Í 1908 sendi Súsanna Helena løgtinginum umsókn um at fáa statsstuðul upp á 15.000 kr. til til ein bygning til landhúshaldsskúla í Kirkjubø. Men løgtingið samdist um at svara, at tað ikki kundi mæla til, at statsstuðul varð veittur umsøkjaranum (Løgtingstíðindi, 216, 1908). Súsanna Helena søkti aftur bæði í 1909 og 1910 um at fáa figging, t.e. ein statsstuðul á kr. 15.000, til ein bygning til landhúshaldsskúla í Kirkjubø. Men tað var ongantíð neyðug undirtøka í løgtinginum fyri tí. Í 1909 atkvøddu 7 løgtingslimir fyri, at málið skuldi takast upp, men 9 vóru ímóti. Sama ár fekk løgtingið eina umsókn um at reka ein vanligan hús-



***Mynd 6.** Genta í roykstovu. Johannes Klein hevur tikið myndina í 1898. (Mynd: natmus.dk )*

**Bókmentir:**

Aftur húshaldsskúlin. Í: Oyggjunum 20. febr. 1907. Tórshavn.

Andreasen, Karen E. & Rasmussen, Annette. 2020. Husholdningssagens betydning for den lille bys modernitet – kvinders uddannelse og erhverv inden for husholdning 1890-1940. Í: Erhvervshistorisk Årbog 2020.

Atlanten, Medlemsblad for Foreningen „De danske Atlanterhavsøer“. 1. Bd. 1904-1906. Keypmannahavn. 1906.

Atlanten, Medlemsblad for Foreningen „De danske Atlanterhavsøer“. 2. Bd. 1907-1910. Keypmannahavn. 1910.

Atlanten, Medlemsblad for Foreningen „De danske Atlanterhavsøer“. 3. Bd. 1911-1914. Keypmannahavn. 1914.

Becker, Vald. 1935: Nogle betraktninger over kostproblemet paa Færøerne.“ Ugeskrift for Læger. 97. København.

Boeg, Andreas, 1902: Et epidemiologisk Bidrag til Lungeftisens Ætiologi. København.

Boeg, Andreas. 1906. Om Færingen og hans Levevis. Í: Atlanten, Medlemsblad for Foreningen „De danske Atlanterhavsøer“. Keypmannahavn

Evni um háskúlan uppaftur tikji. Í: Oyggjunum 19. des. 1906. Tórshavn.

Fagskole for husholdning. Í: Dimmalætting 22. mai 1909. Tórshavn.

Fólkafundur. Í: Føroyingatíðindum 15. juni 1899. Tórshavn.

Fólkafundurin á Hvalvíksskarði. Í: Fuglaframa 23. mai 1899. Tórshavn

Góðgæti tilkeyps í Havn. Í: Oyggjunum 18. juni 1908. Tórshavn.

Husholdningskursus til Sommer. Í: Dimmalætting 10. mai 1910. Tórshavn.

Husholdningskursuset. Í: Dimmalætting 27. aug. 1910. Tórshavn.

Hví er Føroya kvinnan bleik og kraftaleys? Í: Oyggjunum 7. sept. 1905. Tórshavn.

Jacobsen, Jørgen-Frantz. 1976. Moderne Udvikling i en Nøddeskal. Í: Tingakrossur. Tórshavn.

Joensen, H.D. 1956. Tuberklarnir í Føroyum í 19. og 20. øld. Í: Fróðskaparritum 5. bók. Tórshavn.

Løgtingstíðindi 1900, 1901, 1908, 1909

Mammur og døtir Matmøðrir og Arbeiðskonur. Í: Oyggjunum 21. mai 1906. Tórshavn.


haldsskúla. Tá sendi Anna Margretha Frederikka Jacobsen løgtinginum eina umsókn um at fáa 2.000 kr. til ein húshaldsskúla í Klaksvík. Hon bað eisini um eina minni árliga upphædd til rakstur. Løgtingið svaraði henni, at hetta í núverandi løtu ikki læt seg gera (Løgtingstíðindi, 243, 1909).

## Húshaldsskeiðið hjá Dansk Kvindesamfund ætlaði at útbúgva føroyska kvinnu

Tá ið løgtingið ikki vildi stuðla einum føroyskum húshaldsskúla, tóku onnur hesa ábyrgd á seg. Í 1909 sendi húshaldsskeiðið hjá Dansk Kvindesamfund áhugafelagnum De Danske Atlanterhavsøer eina umsókn, har søkt varð um stuðul til at útbúgva eina lærarinnu, sum kundi standa á odda fyri húshaldsskeiði í Føroyum (Atlanten, 457, 1909). Felagið Dansk Kvindesamfund skipaði javnan fyri ferðaskeiðum í húshaldi, og tað bar til at søkja um at fáa slík skeið í lag. Felagið De Danske Atlanterhavsøer hevði til endamáls at: *„at fremme Udviklingen af de til Danmark knyttede fjernere Rigsdele, navnlig i økonomisk Henseende, samt at styrke Solidaritetsfølelsen mellem Rigets Beboere*“ (Atlanten, 28, 1904). Felagið varð býtt sundur í deildir, og eisini var ein føroysk deild. Eftir viðmæli frá føroysku deildini hevði felagið sett 100 kr. av á fíggjarætlanini til at hjálpa einum føroyingi at útbúgva seg til endamálið (Atlanten, 457, 1909). Í føroysku deildini sótu m.a. Christian Bærentsen amtmaður og dr.phil. Jakob Jakobsen (Atlanten, 454, 1909). Felagið hevði um hetta mundið uml. 1250 limir, og yvir 60 teirra búðu í Føroyum (Atlanten, 522, 1914).


Góðgæti tilkeyps í Havnini.
Výggiskotin havragrýn (í leysari vegt) fyri 18 oyr. pundið; ósótt mjølblandað hvítt sukur fyri 20 oyr. pundið; cacao, ið smaðkar sum at hugsa sær torvmold, fyri 2 kr. pundið; fargað te, ið er sum eitur at drekka, výggiskotið og kleimið rugmjøl, ið drepur friskan maga uppá stutta tíð og mangt tilíkt.

***Mynd 7.*** *Góðskan á matvørum í Havn verður speirikin í Oyggjunum í 1908. (Heimild: Oyggjarnar 18. juni 1908)*

## Skeið í Havn við donskum ferðalærarinnum (1910)

At útbúgva eina føroyska lærarinnu til at standa á odda fyri húshaldsskeiðunum her á landi gjørdist tó ikki veruleiki. Í 1910 varð skipað fyri ferðaskeiði í Føroyum. Tað er ikki greitt, um hetta var eftir umbøn úr Føroyum, men sum skilst vóru tað mong her, ið ynsktu slíka frálæru. Birgitte Berg Nielsen, ið var fyristøðukvinna fyri húshaldsskeiðunum hjá Dansk Kvindesamfund, var vitandi um tørvin og ynskini í Føroyum um at seta ein húshaldsskúla á stovn.

Tann 10. mai 1910 stóð ein kunning í Dimmalætting við eini skeiðslýsing um, at Dansk Kvindesamfund fór at skipa fyri skeiði í Havn í vanligum húshaldi. Tað fór at verða undirvíst í føðslulæru á skeiðinum, sum júst var tað, ið stórur tørvur var á. Dansk Kvindesamfund fekk eina fasta upphædd frá statinum til at skipa húshaldsskeiðini fyri. Felagið segði seg eisini hava fingið stuðul frá De Danske Atlanterhavsøer til at skipa fyrsta húshaldsskeiðið í Føroyum fyri (Dimmalætting, 2, 1910).

## Ein onnur loysn – tó stór undirtøka

Tað, ið hendi, var, at tann landhúshaldsskúlin, ið skuldi vera heimligur og trúgvur mótvegis føroyskari matgerð, ikki varð settur á stovn, men í staðin varð skipað fyri ferðaskeiðum við donskum húshaldslærarinnum. Í juli og august fóru 70 kvinnur á fyrsta húshaldsskeiðið, sum varð hildið í Tórshavnar kommunuskúla (Dimmalætting, 2, 1910). Tað skilst í bløðunum, at næmingar á skeiðinum høvdu gjørt ymsar rættir við tvøsti sum rávøru. Tá ið skeiðið var av, var ein framsýning í Kommunuskúlanum. Har vóru 16 rættir sýndir fram, sum allir vóru av tvøsti. Rættirnir høvdu í stóran mun støði í donskum matsiði (Dimmalætting, 2, 1910).

Í fleiri umførum varð skipað fyri skeiðum í húshaldi í Føroyum. Skeiðini vórðu hildin runt um í landinum, og tað var sera stórur áhugi fyri skeiðunum. Kvinnurnar høvdu føðslulæru og lærdu at gera heilsugóðan kost fyri bíligan pening. Uttan iva hava kvinnurnar fingið nyttu av hesum lærdómi og hava tikið hann til sín og nýtt hann í matgerðini til gagns fyri húskið. Tó kann hugsast, at fíggjarviðurskiftini hjá einstaka húskinum hava havt sína ávirkan á, hvussu nógv matarhaldið kundi broytast. Harumframt var tað torført at steðga tí ráki, at føroyingar livdu alsamt meira av handilsvørum, ið kanska ikki høvdu bestu dygd.

Her hevði ein føroyskur húshaldsskúli við longri skeiðum uttan iva gjørt væl størri mun.





***Mynd 8.*** *Kvinnur drekka kaffi umborð á mjólkarbátinum. (Mynd: Tjóðsavnið)*

## Nútíðargerð og ring føðsla

Fyrst í 1900-talinum var munur á lívshátti millum bygd og bý – og munur var millum handilspláss og smápláss, og lutvíst var gerandiskosturin enn rættiliga siðbundin. Men gongdin í samfelagnum var tann, at húskini alt meira fóru at liva av handilsvørum. Í 1930-árunum var matarskiftið í samfelagnum sera sjónligt, og kosturin var ofta fyri atfinningum. Jørgen-Frantz Jacobsen var millum tey í 1930-árunum, sum umrøddi nútíðargerðina í Føroyum. Í greinini „Moderne Udvikling i en Nøddeskal“ tekur hann saman um, hvussu nógv kosturin var broyttur hjá føroyingum:

*„Færingerne er siden 1850 gaaet over til en helt anden Ernæring. I enkelte afsides Bygder holder man sig ganske vist endnu i Hovedsagen til den ældgamle færøske Kost, der har haft Hævd siden Middelalderen, og hvis Sammensætning beror paa Aarhundreders for længst glemte Erfaringer, men de Allerfleste lever nu af billige Butiksvarer: fint Brød, Konserves, Margarine, Te, Sukker. Hertil kommer Kartofler, men Mælk er der ikke nok af, fersk Kød er ofte svært at opdrive, og selv Fisk kan der være Mangel paa.*“ (Jacobsen, 1, 1936)

Um sama mundið vísti Valdemar Becker, lækni í Vestmanna, á, at føroyingum trutu kálk. Hann umrøddi seinni í Ugeskrift for Læger (1935), at ein stórur partur av fólkinum ikki fekk nóg mikið av mjólk. Eitt nú hevði ein yngri kona greitt honum frá, at ikki var gjørligt hjá henni at fáa hendur á so frægt sum 1 dl av mjólk, og feskan fisk hevði hon ikki smakkað alt summarið. Kvinnan búði í eini fjarskotnari bygd við góðum haga, so mjólkin treyt ikki í bygdini. Læknin helt stóra andsøgn vera í hesi støðu. Becker sigur eisini, at ljóst mjøl og skalleyst rís eru komin í staðin fyri byggdrýlin. Fólk keyptu heldur margarin, tí tað kostaði minni (Becker, 1269, 1935). – Hetta bendir eisini á, at tað var stórur tørvur á ábótum og upplýsing í samfelagnum.

Í 1930-árunum var húshaldsskúli nøkur ár í Havn. Tá var eisini vorðið vanligt, at nakrar fáar føroyskar kvinnur fóru niður til Danmarkar á húshaldsskúla um árið. Longu í 1909 stóð ein lýsing fyri húshaldsskúlanum hjá Birgitte Berg Nielsen í Dimmalætting, sum helst er elsta lýsingin frá einum slíkum skúla í einum føroyskum blaði.


Patursson, Helena. 1907. „Matreglur fyri hvørt hús“. Thorshavn.

Patursson, Sverre. Den færøiske kvinde. Í: Husmoderen. Tidsskrift for hus og hjem 1904. Kristiania.

Petri, Gerda & Kragelund, Minna. 1980. Mor Magda – og alle de andre. Husholdning som fag fra 1900 til i dag. Ringsted.

Simonsen, Lív Arge. Fyrilestur í sambandi við Granskingarmiðlan „At skúla kvinnur í Føroyum 1900-1914. Við denti á leiklutinum hjá áhugafeløgunum Dansk Kvindesamfund og De danske Atlanterhavsøer“. Landsbókasavnið 23. febr. 2022

So framt sum onkur góður maður. Í: Oyggjunum 18. des. 1907. Tórshavn.

Vevskúlar og húshaldsskúlar: Til Føroya Kvinnur. Í: Oyggjunum 23. okt. 1906. Tórshavn.

Vevskúlar og húshaldsskúlar. Í: Oyggjunum 5. sept. 1906. Tórshavn.

# KIRKJUTÍGGJUND 1693-1900 SUM UPPLÝSING UM SKIFTANDI VEÐURLAG FYRR Í TÍÐINI



**Rolf Guttesen**
rolfg@setur.fo
Cand.Scient
Geografur Emeritus

Veðurlagið er broytiligt, dag um dag, ár um ár og øld eftir øld. Men kunnu vit vita og siga nakað álítandi um veðrið, tá vit koma eini 150 ár aftur í tíð. Tær fyrstu samanhangandi veður-observatiónirnar í Føroyum við instrumentum byrjaðu í 1872.

Men harumframt finnast skrivligar keldur, sum óbeinleiðis kunnu geva okkum eina lýsing av veðurlagnum aftur til 1600-talið. Keldan, sum skal rannsakast í hesi grein, finst í kirkjuroknskapum. Teir elstu føroysku kirkju-roknskapirnir ganga aftur til 1693 og halda á fram til 1900, íalt 207 ár. Tey fyrstu árini eru ikki allar 37 kirkjusóknir við, men tær koma so líð-andi. Tilsamans eru sostatt næstan (207x37) ella 7.659 roknskapir funnir og kannaðir. Tað mesta er funnið á Tjóðskjalasavninum í Havn, og haraftrat nakað á Sjællands Landsarkiv í København.

Alt í hesi rúgvismiklu keldu er enn ikki skrivað í rokniark, men í hesi greinini havi eg valt at brúka ein úrdrátt, sum umfatar eina meðalstóra sókn í hvørjari av teim seks sýslunum í landinum. Hesar seks sóknirnar í úrdráttinum eru: Klaksvík (Waay), Eiði, Kollafjørður, Sørvágur, Húsavík og Froðba.



## Hvat eyðkennir hesar bygdir?

Hesar seks nevndu bygdirnar umboða 17 % av øllum fólkinum uttanfyri Havnina. 18 % av neytunum eru í hesum bygdum, og nakað tað sama av seyðinum.

Tíggjundin var býtt í triðingar: til kirkju, til prest og til kongs. Í hesi greinini kanna vit bara kirkjutíggjund. Smørtíggjund var latin av hvørjari kúgv í bygdini. Og 16 kýr lótu 1 vág[1] í smøri. Viðvíkjandi ullatíggjund so var sum høvuðsregla tíggjund latin av hvørjum flettum seyði, ella 1 vág í ull av 80 seyðum. Í Streymoy tó av 100 seyðum. Onnur smærri frávik vóru.

Av talvuni sæst eisini, at trý lutføll ella proportiónir eru fastar og helst galdandi yvir langa tíð. Hesar proportiónir eru íkomnar spontant, sum úrslit av strukturinum í landsins vinnuvegum, tvs. ikki sum úrslit av lógum ella samtyktum.

Av hesum sæst, at mjólkin var nógv tann størsta einstaka kaloriukeldan hjá fólkinum. Tí kann man siga, at kúgvin var berandi táttur í føroyska búskapinum tá á døgum. Tað kann sigast soleiðis: Uttan neyt, einki samfelag í Føroyum. Ella nakað tað sama kann lesast burtur úr hesum citati hjá Sigvardsen[2]: *„Fyrsta neyðin er hoyneyðin og onnur var torvneyðin.“* Tí fara vit fyrst at kanna hvussu stabil ella skiftandi hendan keldan var.

## Neyt, summarveðrið og hoyggj

Neytini gingu úti alt summarið, frá mai til oktober, helst í summarhaganum, sum eisini kallaðist undir-, neyta- ella húshagi.Veturin var langur, einar 5-6 mánaðir og hesa tíð stóðu neytini inni á bási í fjósinum. Hesa tíðina skuldu tey hava hoyggj at eta, og man roknaði eitt kúfóður, sambært Svabo[3], at vera 20 byrðar ella 1.200 kg. Rasmussen[4] hevur tó eitt tal, sum er eitt vet hægri, hann sigur *„Fóðrið var heldur knappliga tilætlað, 21 til 25 byrðar vóru hildnar at vera ivaleysar at seta kúgv á.“* Men, um veturin gjørdist longri enn vanligt, so var hoyneyð. Ella var grasvøksturin um summarið minni, ella hoyggingin vánaligari enn vanligt, so stóð illa til. Hoyggið kom av grasinum, sum vaks í bønum, og gras veksur vanliga væl í Føroyum. Men eitt summar við regni, kulda og vindi kundi geva vánaligan ávøkst. Um hoyggið ikki tornaði, so kundi tað rotna ella fúka burtur í illveðri. Kom minni hoyggj í hoyggjhúsið enn vanligt, var neyðugt at regulera neytatalið niður, so at tey neyt, ið eftir vóru, kundu liva veturin yvir. Hendan ketan millum summarveður, sum gjøgnum fleiri lið endar sum smørtíggjund, vísir nakað um bæði samanhangin og komplexitetin í processini.

**Summarveðrið > Gras > Heystveðrið > Hoyggj > Vetur > Neyt > Mjólk > Smørtíggjund**

## Smørtíggjund 1696-1900

Mynd 1 vísir gongdina í smørtíggjund, sum er umroknað til tal av mjólkikúm. Á myndini eru 2 kurvar, sum á ymsan hátt vísa tað sama. Tann fyrsta, við reyðum frámerki, vísir tað árliga meðaltalið av mjólkikúm í teim seks sóknunum. Tann næsta er ein matematisk[5] útjavning, sum vísir høvuðstendensirnar í einum stórum taltilfari.

Skal mann draga nakað alment burtur úr myndini, so er tað, at tann útjavnaða polynomium-linjan hevur tríggjar høvuðstendensir, og tað er, at

- Bæði elsti og yngsti partur av kurvuni liggja lágt. Serliga tey fyrstu 18 árini – 1696 til 1714 – liggja tølini sum ein bólkur ógvuliga lágt í mun til alla restina.
- Tveir ryggir eru, sum hava maximum ávikavist umleið 1730 og 1880.

| | Decimaltøl | Avrundaði tøl |
|---|---|---|
| Fólk uppá kúnna | 2,06 | **2:1** |
| Lomb uppá fólki | 6,84 | **7:1** |
| Lomb uppá kúnna | 14,15 | **14:1** |
| Mjólk í % av saml. kaloriutali | --- | **42 %** |
| Kjøt og tálg í % av kaloriutali | --- | **19 %** |
| Innflutt korn | --- | **24 %** |
| Korn velt í Føroyum | --- | **8 %** |

***Talva 1**: Lutføll millum fólk, neyt og seyð í føroyska búskapinum. Harnæst procenttøl, sum vísa støddina av teim týdningamestu kaloriukeldunum. Tølini eru roknað fyri 1813 eftir Löbner'sa tabellum. Kelda: Guttesen 1999*

[1] 1 vág er 18 kg
[2] Sigvardsen (2006:1743)
[3] Svabo (1782/1959): 1308
[4] Rasmussen 1949:12-14
[5] 4. ordans polynomial-funktión




*Mynd 1. Tey einstøku tølini, ið avlesast á y-aksanum, eru tal av neytum í eini meðalbygd, roknaði sum meðal av seks útvaldum bygdum hvørt árið. Tann „róliga" kurvan er ein 4. stigs polynomial-funktión. Kelda:Kirkjuroknskapir*

- Miðskeiðis her í millum liggur ein dalur, eitt minumum, sum er lægst umleið 1805.

Tann fyrsta lægdin, seinast í 1600-talinum, kann setast í samband við sokallaðu lítlu ístíðina, ella „*Litle Ice Age*", sum endar umleið 1715. Hon er kend um alt Norðureuropa. Oceanografurin B. Hansen[6] setir hesa klimabroyting í samband við broytingar í havstreymunum kring Føroyar. Við øðrum orðum, so fáa vit við teim elstu tølunum í kirkjuroknskapum ávíst, at tann lítla ístíðin eisini hevur ávirkað vinnuna og lívið í Føroyum.

Miðlægdin setir síni spor millum 1780-1820, og var hendan tíðin merkt av mongum ringum árum. Serliga árini 1803 til 1812.

## Seyður, vetrarveðrið og fellir

Seyðurin gekk úti alt árið, og í eldri tíðum fekk hann einki eyka fóður um veturin. Var veturin langur við nógvum kava, doyði nógvur seyður. Tað vóru ymsar veðurumstøður, sum kundu raka seyðin hart. Í stuttum kunnu vit skilja millum tvær støður.

Tann fyrra snýr seg um ærnar, sum skulu liva veturin yvir.

Hin næsta er um lembingartíðina, har nógv smálomb kunnu doyggja.

Veturin kann vera langur við liggjandi kava. Aftaná toybil kann koma frost, og ein glerskorpa legst oman á kavan. Kuldi og stormur gera, at seyðurin doyr í kulda ella í hungri.

Í hini næstu støðuni veldst um veðrið í lembingartíðini, men eisini um, hvussu væl ella illa ærnar eru fyri at geva lombunum mjólk. Eru tær væl í holdum ella rak. Kuldi, regn og vindur kunnu gera av við smálombini. Stórt deyðatal millum seyð og lomb kemur ofta í lutfalsliga stuttum tíðarbilum við ringum veðri. Javnan eru felli, sum vísir stórt deyðatal. Tað kemur meira enn so fyri, at í fellisárum verður bert ein tíggjundapartur flettur sammett við tað vanliga. Aftrat hesum kemur, at tað tekur fleiri ár, eini 5-6-7 ár, áðrenn áseyðatalið er komið upp aftur á skipan.

Av hesum báðum lýsingum av seyði og neytum í mun til summar- og vetrarveður, skal vísast á, at tað er ein „innbygdur" munur millum kurva-gongdirnar. Neytatalið verður regulerað av fólki í mun til nøgd og dygd av vetrarfóðri. Seyðurin má taka tað fóðrið sum er at fáa í vetrarhaganum. Fyrr var einki eyka fóður givið, og seyðahús vóru eingi. Tey fyrstu seyðahúsini í Vágum vórðu bygd í 1820-unum. Í „Indberetninger" frá 1831[7] lesa vit: „*Kongsleilændingerne Zacharias Heinesen, Joen Guttesen og Heine Jensen i Bøe have for henved 8 Aar siden opført et velindrettet Faarehuus.*" Og meira hendir í so máta: „*I Gaasedahl er senere af fælles ejere blevet opført 2 Faarehuuse, ligesom der og kommer Faarene til hjælp med Høe.*" Hetta eru helst millum tey fyrstu boð um eina nýggja tíð, sum eisini bleiv stuðlað fíggjarliga af „Det kongelige Landhusholdnings Selskab" í Keypmannahavn. Ein nýggj og umfatandi lýsing av seyðahaldinum er at finna hjá H. í Brekkunum.[8]

## Ullatíggjund 1693-1900

Grafurin vísir talið av lombum, sum lótu tíggjundaull. Har er tó innbygd ein óvissa. Tí ullin var latin av hvørjum flettum lambi, ella sum høvuðsregla ein vág av óvaskaðari ull fyri hvørji 80 lomb. Lombini blivu flett út á heysti, ofta í oktober mánað. Men tíggjundin skuldi latast inn longu á ólavsøku. So helst hevur man havt okkurt slag av a-conto skipan.

Myndin vísir eisini, at tey fyrstu 10-12 árini liggja tølini lágt, men taka seg so upp til eitt hægri støði. Tann róliga kurvan[9] hevur nakað sama skap sum tann í fyrru myndini, men tó er lægdin miðskeiðis í gongdini ikki so týðulig. Ársvirðini hava, sum longu nevnt, eina nógv óróligari gongd enn hjá neytunum. Men eisini er eyðsýnt, at tað hanga líkasum glerpípur niðurúr. Hetta eru fellisárini, sum síggjast aftur á hendan hátt.

Aftaná eitt ringt fellisár sær man, at talið av seyðum so líðandi fer at vaksa aftur, men oftast tekur tað eini 6-7-8 ár áðrenn sloppið er upp á eitt miðal støði aftur. Í 1807 tók tað 7-8 ár at koma fyri seg, og í 1816 nakað tað sama

## Aðrar keldur um ring ár í Føroyum

Fyri at gera tey turru tølini í grafunum meira livandi, og vísa hvussu fólk tá á døgum upplivdu støðuna, skal eg endurgeva eina samtíðarkeldu. Hon lýsir støðuna við hungri og neyð. Taka vit eitt nú kopibókina hjá amtmanninum, so sendir hann á hvørjum ári eina ella fleiri „*Indberetninger*" um skilið viðvíkjandi mjólkineytum, seyðinum og eisini korninum og útróðrinum til Rentukamarið[10]. Ein frágreiðing til Rentukamarið í 1807 frá Löbner amtmanni ljóðar soleiðis:

> „Færøe er desværre i dette Aar i beklagelig Forfatning. Den usædvanlig haarde Vinter og det endnu haardere Foraar har saaledes



*Neytakonur í Fugloy. Mjólkin var nógv tann størsta einstaka kaloriukeldan hjá fólkinum og kúgvin var berandi táttur í føroyska búskapinum. Mynd A.P. Hansen*

[6] Hansen (2000:219)

[7] Indberetninger sommer 1831
[8] Brekkunum 2017
[9] Polynomial-kurvan
[10] Amtskopibók 1807: 2. juni

taget af Faarene, at der i Mands Minde paa disse aldrig skal have været saa stort Affald [felli]. De lykkeligste Steder, som kun ere faa, har næppe beholdt de 2/3 deele, paa de fleste er kun 1/3 deel tilbage og mangfoldige Steder end ikke 1/10 levnede."

Í støðum slapp bert tíggjundi hvør seyður livandi gjøgnum veturin. Og viðvíkjandi lembingini er lítið at vænta, Löbner skrivar soleiðis: *„Med Læmmingen af disse faa tilbageblevne svage Faar er Udsigterne ligesaa slette, om ikke slettere, ja man faaer daglig Efterretning, at saavel af de første, som de sidste, endnu et ikke ubetydeligt Antal døer.“* Hoyggið hevur verið lítið, og veturin langur: *„Med nytten af Kiøerne seer det ikke bedre ud, af Mangel paa Foder, som en Følge af den i afvigte Aar slette biergning og den strenge langvarige Vinter.“*

Várróðurin á Norðhavinum hevur vegna *„overvældende storme har ei været heldig.“* Og um kornveltingina verður skrivað: *„Jorddyrkningen til Kornavl er ogsaa meget indskrænket, formedelst den i Sæde Tiden indfaldende langvarige Frost.“*

Hendan frágreiðingin hjá Löbner amtmanni gevur eina góða mynd av teimum trongu korunum, sum allar tær lívsneyðugu vinnurnar eru í, tá veturin er langur og ringur. At hetta ikki bert er ein støk hending, vísir frásøgnin um eitt annað ringt ár í hesi ringu tíðini fyrst í 1800-talinum. Í 1812 skrivar Löbner soljóðandi[11]:

„Kornhøsten næsten aldeles er at ansee som ingen.– Siden Bohnitz Afreise [hann fór av Havnini við „Den Nye Jubelfest“ tann 21. september, RG], er det uophørlig vedbleven med rasende Storm og Regn, som den smule Korn … ganske er afpisket, og det lidet, der er levnet, er af ingen Værdi. Vi skiønne at omtrent af 1500 Tønder færøsk Korn, som Høsten vilde have kundet afgivet, er ikke den 1/5 Deel bleven indhøstet, og denne deel er endog den sletteste.“

Illveður er farið illa við kornakrunum. Miðalframleiðslan av korni í Føroyum var um ár 1800 einar 1500 tunnur, meðan innflutningurin av korni javnan var okkurt um 5000 tunnur. Hetta árið var tann føroyska framleiðslan væntandi bert 300 tunnur. Var støðan ring við korninum, so var líka illa fatt við hoynum og neytunum:

„Høbjergningen vil det af foranførte [rasende storm og regn]… kun faae et maadeligt Udfald, paa mange Steder er Høet end ikke slaaet, mindre fuldkommen bierget, og det biergede kraftløst… Hver 6. Koe – af Mangel paa Foder – maa slagtes, som i det mindste giver af imellem 3 til 400 Stk. Sligt et Tab er ikke oprettelig i mindre end 3 Aar, forudsat at disse blive gode.“

[11] Amtskopibók 1812, 10. oktober




*Mynd 2: Tey einstøku tølini, sum lesast á y-aksanum, eru roknað sum meðal av seks útvaldum bygdum. Tann „róliga“ kurvan er sum 4. stigs polynomial-funktión. Kelda: Kirkjuroknskapir*




*Mynd 3. Gongdin í sólplettum frá 1600 til 2009. Maunder- og Dalton-minimum eru merkt. Ein lægd um ár 1900 hómast eisini. Kelda: Robert A. Rohde. Global Warming Art project*

## Sam-variatión millum seyða- og neytatal

Hóast ein niðurstøða man vera, at neytatalið verður mest ávirkað av summarveðrinum, og seyðatalið mest ávirkað av vetrarveðrinum, so vísa kurvarnar báðar eina ávísa sam-variatión. Miðskeiðis í hendingagongdini er ein dalur í báðum kurvum, umleið 1805. Líka klárt er tað, at fremst í røðini – áðrenn 1715 eru tølini í báðum førum heilt lág. Og seinast í báðum kurvum er eisini ein niðurgongd. Seyðakurvan hevur tó nøkur høgg niður, sum ikki reiðiliga síggjast aftur í neytakurvuni, til dømis um 1720 og 1745.

## Kunnu svingini í sólplettum forklára nakað?

*„Solpletter er et tydeligt tegn på Solens aktivitet.“* Soleiðis sigur Pedersen (2011) í greinini „Solaktivitet og klimaændringer.“ Størri aktivitetur á sólini vil siga, at størri sólorka rakar jørðina, og hetta ávirkar veðurlagið og gróðurin. Her skulu vit vita um tilfarið í teim føroysku kirkjuroknskapunum um smør- og ullatíggjund kann „forklárast“ við vitan um sólplettirnar.

Taka vit aftur polynomial-kurvurnar fyri neyt og seyð, var tað eyðsýnt, at minima er í báðum endum, umleið 1700 og 1900, og haraftrat er eitt minimum miskeiðis í gongdini, um 1800-1815. Hetta svarar heilt væl við tann umleið 100 ára cyklusin, sum kallast Gleissberg[12] cyklus. Tann elsti parturin av kurvuni kemur upp úr dýpinum fyrst í 1700-talinum, og svarar hetta dýpi til eina periodu við fáum ella ongum sólplettum, sum kallast Maunder-minimum. Tað roknast at ganga frá 1645 til 1715. Lægdin miðskeiðis í gongdini, 1800 til 1815, sum gongur aftur í báðum kurvum, hevur navnið Dalton-minimum.

Seyðakurvan svingar fleiri ferðir í takt við sólplettarnar og teirra 11-ára cyklus. Men serliga í seinnu helvt kunnu svingini ganga mótsatt. Tað vil siga, at 11-ára cyklusin slær bara partvís ígjøgnum uppá seyðakurvuna, og enn minni uppá neytakurvuna. Har aftur ímóti kan man siga, at tann longra Gleissberg-cyklusin uppá umleið 100 ár endurspeglast í bæði neyta- og seyðakurvuni.

## Samanumtøka

Tað, sum ger munin millum seyð og neyt í hesum føri, er, at seyðurin gongur úti alt árið. Neytini standa á bási umleið eitt hálvt ár og fáa føður. Lívsleiðin hjá neytunum var nógv meira „regulerað“ enn tann hjá seyðinum.

Tann 100-ára Gleissberg cyklusin í sólplettatalinum er ávíst í hesum datatilfari.

Somuleiðis kann tað sigast, at tann sokallaða lítla ístíðin hevur sett síni spor í føroysku kirkjuroknskapunum. Í øllum førum skal man minnast til, at báðir hesir samanhangir millum sólplettar og seyð ávikavist neyt eru kompleksir samanhangir. Nógvir faktorar virka upp á ymiskar mátar. Tað er ikki bara A > A. Ella til dømis sólplettir > smørtíggjund. Tað eru altíð fleiri broytilig árin, sum hava ávirkan. Tað skal leggjast aftrat, at í hesi grein eru tølini í kirkjuroknskapunum tikin fyri áljóðandi. Møgulig feilskriving ella óreglulig framferð kann koma fyri í gomlum skjølum, men er ikki ávíst í hesum umfari.

[12] Mouradian, Z (2002)

## Bókmentir:


Anonym (2009): Solen på slingrekurs. <Videnskab.dk>

Brekkunum, H. í (2017 ): Seyður í søgu og veðri. Sprotin.

Guttesen, R. (1999): Commander Löbners Tables and Vital Necessities in the Faeroe Islands in 1813, Geografisk Tidsskrift; bind 99; s 75-80

Hansen, B. (2000) Havið. Skúlabókagrunnurin. Tórshavn

Indberetninger ifølge Amtsordre af 23. November 1830, Tjóðskjalasavnið. Tórshavn (eisini á <History.fo>)

Löbner (1807): Færøe Amts Kopibók 1806-1809. Tjóðskjalasavnið. Tórshavn

Löbner (1812): Færøe Amts Kopibók 1811-1813. Tjóðskjalasavnið. Tórshavn

Mouradian, Z (2002): Gleissberg cycle of solar activity. Proc. of the Second Solar Cycle and Space Weather Euroconf. pp 151-154

Pedersen, J.O.P. (2011): Solaktivitet og klimaændringer. Kvant, pp 26-31.

Rasmussen, R. (1949): Sær er siður á landi. Endurminningar. Tórshavn

Sigvardsen, P.J. (2006): Torvið í Føroyum í søgu og siðsøgu. Annales societas scientarum Færoensis Vol. XLVI. Tórshavn

Svabo, J.C. (1782/1959): Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782. København




# FYRSTU ORÐINI HJÁ FØROYSKUM BØRNUM

– Hvørji eru fyrstu orðini, sum føroysk børn duga at siga?
– Líkjast tey orðunum, sum børn í øðrum londum siga?
– Hvat er serligt við orðunum, og hví eru tað júst hesi orðini, ið børnini læra fyrst?

Hví skulu vit læra nógv orð? Og hvønn týdning hevur hetta? Orðfeingi hjá børnum hevur stóran týdning, tá barnið samskiftir og í samspælinum við onnur – og fyri málsligu menningina hjá børnum, til dømis førleikan at gera setningar. Jú fleiri orð barnið kennir, jú skjótari gongur at læra enn fleiri orð. Gransking vísir, at málførleiki eisini er tætt knýttur at lesiførleikunum seinni í lívinum, tí fleiri orð tú dugir, lættari er tað at skilja tað, sum tú lesur. Týdningurin, sum máltøka hjá børnum hevur fyri børnini, eisini seinni í lívinum, er tískil stórur. Tí hevur tað stóran týdning at fáa vitan til vega um máltøku hjá børnum og at granska í máltøku hjá føroyskum børnum. Soleiðis læra vit bæði nakað málfrøðiligt um okkara móðurmál og máltøkuna hjá børnum, sum eisini kann nýtast, tá vit hugsa um fleirmælt børn.



**Sissal M. Rasmussen**
sissalmr@setur.fo
Ph.d.,Adjunktur
Námsvísindadeildin
Fróðskaparsetur Føroya

### Uppgávan er stór

Tað at læra mál er ein kompleks uppgáva. Barnið skal læra at knýta orð og týdning saman, t.v.s. at um tað hoyrir orðið *koppur*, so skal tað knýta henda „ljóðpakkan“, barnið hoyrir, í týdningin, sum orðið hevur.

Børn skulu eisini læra, at tað er ikki bara koppurin, sum tey drekka úr, ið nevnist koppur, men eisini allir møguligir aðrir koppar, ið kunnu hava ymiskar litir, ymisk skap og kunnu verða gjørdir úr ymiskum tilfari.

Tey skulu eisini læra, at eitt orð kann hava fleiri týdningar, og at orð kunnu nýtast á ymiskan hátt. Eitt dømi er orðið, ið børnini hoyra úttalað sum /vevur/. Hetta orðið merkir *vegur at koyra á, vevur at veva við* og *veður* sum til dømis regn, men orðini ljóða heilt líka, hóast tey hava ymiskar merkingar. Eitt annað, sum hevur týdning fyri uppgávuna hjá barninum, tá tað skal læra seg mál, eru bendingar. Barnið skal læra, at tá tey hoyra orðið „*skógvur*“ og síðani t.d. setningin „*lat teg úr skónum*“, tá er hetta sama orð, men ljóðliga er orðið broytt, og bara byrjanini av orðinum ljóðar líka. Alt hetta skal barnið læra við at hoyra nógv og gott mál í umhvørvinum.

### Hvussu læra vit orð?

Børn læra sostatt mál frá tí íkastinum, tey hoyra rundan um seg. Tá tey hoyra okkum samskifta, práta, syngja og lesa fyri sær, so læra tey mál.

Men tey skulu hava íkast, og tí er umráðandi at hyggja at viðurskiftunum rundan um barnið, tá tað snýr seg um máltøkuna. Hvussu nógv tosa vit við børnini, hoyra tey fleiri mál í gerandisdegnum, hava tey eldri systkin, hava tey trupulleikar við millumoyrunum, so tað er truplari at hoyra, lesa tey vaksnu fyri barninum og so framvegis.

### Tað er í veruleikanum ótrúligt

Tað er í veruleikanum ótrúligt, hvussu skjótt pinkubørn læra mál. So nógv orð uppá so stutta tíð! Hyggja vit at grafinum, síggja vit, at børnini duga bara einstøk orð, tá tey halda sín eitt-ára føðingardag, men bara gott hálvt ár seinni duga tey meira enn 100 orð.




### Er *nei* tað fyrsta orðið børn duga?

Nei! Men *nei* er millum tey allar fyrstu orðini, sum børn læra. Tey, sum eru um pinkubørn, fylgja væl við í pjátrinum og royna oftast alt tey kunnu at skilja tað, sum hesi lítlu undrini royna at siga. Helst er tað onkur av hesum orðunum, tú hevur hoyrt eitt pinkubarn siga fyrst:





## Fyrstu orðini

1. babba
2. mamma
3. hey
4. voff voff
5. abbi
6. omma
7. brmm
8. takk
9. bei
10. mm mm
11. nei
12. mæ mæ
13. ja
14. áh áh
15. avv!
16. mjav
17. gvagg gvagg
18. muh
19. banan
20. drekka

Úrslitini vísa okkum tey fyrstu orðini, sum føroysk børn oftast *siga*. Tað fylgist ofta at, tvs. at orðini, sum tey fyrst *skilja*, eru eisini tey, sum tey duga fyrst at *siga*, men um orðini eru torfør at úttala, so hevur hetta ávirkan á nær tey læra at siga orðini.

Barnamál, sum t.d. orðið *lulla* er partur av málsligu menningini hjá føroyskum børnum, men millum fyrstu veruligu orðini er *babba,* og beint í hølunum kemur orðið *mamma*. Fyrstu orðini leggja seg í kjalarvørrinum á pjátranini og eru ofta orð, sum byrja við *m* ella *b*, og ikki krevja meira krongluta artikulatión so sum *k*-ljóðið í t.d. *ketta.*

Taka vit ljóðhermandi orðini úr listanum, so er hetta orðini, sum føroysk børn siga fyrst:

## Fyrstu 20 orðini

1. babba
2. mamma
3. hey
4. abbi
5. omma
6. takk
7. bei
8. nei
9. ja
10. banan
11. drekka (sum navnorð)
12. skógvar
13. halló
14. tyst
15. breyð
16. baby
17. bað
18. heitt
19. meira
20. drekka (sum sagnorð)

## Hvat er serligt við fyrstu orðunum børnini læra?

Kanningin vísir, at navnorð eru tey vanligastu millum fyrstu orðini eins og ljóðhermandi orð so sum *gvagg gvagg og mjav*. Eisini síggja vit, at orðini mamma, babba, omma og abbi og onnur orð knýtt at sosialum samskifti og tørvum, sum barnið hevur, eru millum tey fyrstu 20 orðini, sum børn í Føroyum siga. Greina vit orðini í mun til ljóð, so sæst, at eitt nú eru /m/ og /b/ljóðini, ljóð sum eru í fyrstu orðunum, ið børn læra, og tey ljóðini eru eisini í orðunum, sum børnini í londunum rundanum okkum læra fyrst.

## Hví læra tey júst hesi orðini fyrst?

Gransking vísir ávís felags eyðkenni fyri fyrstu orðini, sum børn duga. Føroyska kanningin byggir á úrslit, ið fevna um 415 børn í aldrinum 8 til 20 mánaðir, tað vil siga, frá tey eru eitt knapt ár til tey eru gott hálvtannað ár. Hetta er tíðarskeiðið, tá tey læra at siga fyrstu orðini og oftast byrja at seta tvey og tvey orð saman og tískil læra seg at gera stuttar setningar. Hetta er fyrsta fetið á veg inn í málsliga heimin, sum er heilt serligur fyri okkum menniskju.

Hvat er tað, sum ávirkar, at børnini læra júst hesi orðini fyrst? Flestu børn siga sítt fyrsta orð, tá tey eru umleið eitt ár. Eitt sermerki tá smábørn læra seg orð er, at tað gongur ofta við rúkandi ferð, og oftast skilja børn nógv fleiri orð, enn tey duga at siga sjálvi.

Nær pinkubørn læra hvørji orð, er ikki tilvildarligt. Tað fortelur okkum nakað um, hvussu børn læra og skilja umhvørvið og verðina rundan um seg og teirra tørv, og hvat fangar teirra áhuga fram um onnur ting. Tískil eru ofta orð og máliskur, sum snúgva seg um tørv fyrst: *tyst, drekka, meira*, eitthvørt vit ofta gera saman við barninum, sum t.d. *bað*, og vendingar, sum knýta seg at onkrum sosialum ella afturvendandi hendingum. Í listanum síggja vit dømi um hetta við orðunum *halló, bei* og *takk*. Flest navnorð eru millum fyrstu orðini, og seinni læra tey fleiri orð, t.d sagnorð, og tá tey duga eina ávísa mongd av orðum, fara tey at seta tvey og tvey orð saman og gera setningar.



## Háttalag

Í kanningini er brúkt eitt háttalag, sum er grundarlagið undir gransking í máltøku hjá børnum í 60 øðrum londum. Háttalagið nevnist MacArthur-Bates Communicative Development Inventories, sum eru foreldrafrágreiðingar, har foreldur krossa av, hvørji orð barnið skilir og dugir at siga, umframt aðrar spurningar um barnið, sum hava týdning fyri máltøkuna.

## Børn eru ymisk

Hóast vit síggja nøkur felags eyðkenni, hvussu børn læra orð, so vísa úrslitini eisini, at tað er ein stór variatión millum ymisk børn. Henda variatiónin sæst eisini í úrslitunum hjá føroyskum børnum. Hyggja vit at grafinum niðanfyri, so sæst, at summi av børnunum duga umleið 25 orð í miðal, tá tey eru 20 mánaðir, meðan onnur duga umleið 250 orð í miðal, hóast tey eru javngomul.

Sostatt er stórur munur á, hvussu nógv orð einstøku børnini duga, og hesir munir síggjast longu heilt tíðliga og kunnu halda á í uppvøkstrinum. Munirnir eru knýttir at ymsum faktorum, m.a. málsliga umhvørvinum hjá barninum, alt eftir hvussu nógv og á hvønn hátt tosað verður við barnið.

Úrslitini frá kanningini vístu sjónligar munir á føroyskum gentum og dreingjum. Føroysku genturnar dugdu fleiri orð enn dreingirnir. Í tølum var munurin rættiliga stórur. Dreingir dugdu í miðal sløk 16 orð í hesum aldursbólkinum, meðan gentur dugdu at siga 29 orð í miðal.

## Hví granska vit í hesum?

Úrslitini av granskingini geva okkum svar uppá nógvar ymiskar spurningar og kunnu síggjast úr ymiskum sjónarhornum. Vit fáa nærri vitan um føroyskt mál. Fyrstu orðini hava eisini serlig eyðkenni. Hesi eyðkenni kunnu snúgva seg um, hvørji ljóð børn læra at siga fyrst, og um tey læra orð við einum ella tveimum stavilsum.

Orðini kunnu eisini siga nakað um samfelagið, sum barnið livir í, og sum eru knýtt at einum føroyskum samteksti. Hyggja vit at orðunum, sum einstøk børn siga, so fáa vit vitan um tørvin hjá børnum, og hesi orðini lýsa ofta gerandisdagin hjá pinkubørnum. Vit fáa eisini vitan um, hvussu nógv orð føroysk børn duga í miðal, tá tey eru ein ávísan aldur. Tað ber sostatt til at kortleggja málførleikar hjá børnum, ið kann hjálpa okkum, um vit skulu kanna, um eitt barn er seinkað í málmenningini og t.d. hevur tørv á stuðuli.

## Hvat orð dugdi tú fyrst?

Ofta hoyra vit fittar søgur um fyrsta orðið, tú lærdi sum barn. Ella kanska minnist tú týðiliga fyrsta orðið hjá barni tínum? Ofta eru tey skrivaði í *Bókina um teg* ella líknandi bøkur. Spyr foreldur ella systkin, um tey minnast, og hygg um orðið er í listanum, tú sært í hesi greinini.

Vit hava við hesum úrslitum fingið meiri granskingargrundaða vitan um barnamál. Men úrslitini í eini slíkari kanning kunnu ikki siga okkum alt um mál og málførleikar hjá børnum, og nógv er eftir at granska í. Vit vita eisini, at summi orð skifta týdning. Eitt dømi er orðið spritt. Lítil ivi er um, at spritt hevur verið partur av orðfeinginum hjá børnum síðstu tíðina, nú korona hevur ávirkað okkara gerandisdag – eisini gerandisdagin hjá børnum.

**Um høvundan:**
Sissal M. Rasmussen, ph.d., Fróðskaparsetur Føroya og Syddansk Universitet, adjunktur á Fróðskaparsetur Føroya. Hon hevur skrivað ph.d-ritgerð um máltøku hjá føroyskum børnum, arbeitt við málsligari menning og at gera tilfar ætlað børnum og teimum, sum eru um børnini.

**Bókmentir:**

Rasmussen, S. M. (2022). Faroese children's first words. *Nordic Journal of Linguistics*, 1-26.
Rasmussen, S. M., & Bleses, D. (2018). Faroese children's early vocabulary acquisition: A Faroese adaptation of the MacArthur–Bates Communicative Development Inventories. *First Language, 38*(6), 641-668.







## Líkjast tey orðunum, sum børn í øðrum londum siga?

Eygleiða vit børn, sum læra ymisk mál, eitt nú føroyskt, danskt, enskt ella italskt, so síggjast líkleikar og munir millum tey orðini, sum børn læra fyrst. Føroysk barn læra orð líka skjótt sum onnur, og innihaldið líkist í ávísan mun, men føroysk børn duga tíðliga orð, sum lýsa familju – mamma, babba, omma og abbi. Donsk børn duga ikki líka tíðliga at siga babba. Hetta kemst helst av, at ljóðini í danska orðinum „far" eru truplari at siga fyri lítla barnið. Og donsk børn hava ikki orðini fyri ommu og abba millum allar fyrstu orðini, men tað hava italsk børn!

# TAÐ FYRSTA „FJARÐAKENDA“ SUNDIÐ

## …ER SUNDALAGIÐ NORÐAN FYRI STREYMIN




**Sissal Vágsheyg Erenbjerg**
sissal@fiskaaling.fo
Ph.d. Fysiskur havfrøðingur
Fiskaaling





**Bogi Hansen**
bogihan@hav.fo
Havfrøðingur
Havstovan


Amphidroma økið við Tórshavn, har lítil munur er á flóð og fjøru, ávirkar vatnútskiftingina í Sundalagnum norðan fyri Streymin (mynd 1). Hetta ger, at Sundalagið norðan fyri Streym tí kann verða nevnt eitt fjarðakent sund. Vit vita ikki um nakað annað tílíkt sund í heiminum.

Vatnútskifting í Sundalagnum norðan fyri Streymin er gjølla lýst í eini kanning, ið er gjørd við teldumyndlinum FarCoast (mynd 2). Hetta arbeiðið hevur víst, at Sundalagið norðan fyri Streym, hóast tað er eitt sund, er heilt serstakt, samanborið við onnur sund.

Hetta kemst partvíst av, at tann sunnasti parturin av Sundalagnum er miðdepil í einum amphidromum økið mitt í Norðuratlantshavinum. Fyribrigdið ger, at Sundalagið norðan fyri Streymin fær nýggjan, útskiftan sjógv í miðal eina viku norðureftir og eina viku suðureftir.

***Mynd 1**: Dronumynd av Sundalaginum norðan fyri Streymin*




### Botnskap í føroyskum firðum

Føroyar eru 18 oyggjar, men undir vatnskorpuni er eitt áhugavert og torskilt landslag, ið vit vita væl minni um, enn vit vita um tey fjøll og teir tindar, sum hevja seg upp úr sjónum. Dýpir undir vatnskorpuni kalla vit havfrøðingar fyri hyljar. Hesir eru umgyrdir av antin landi, ryggjum ella gáttum. Hetta sama er eisini galdandi fyri firðirnar í Føroyum, og gáttir kunna ofta skilja dýpini millum firðirnar. Hesar firðir nevna vit gáttarfirðir.




***Mynd 2**: Til vinstru kort yvir Føroyar. E er Eiði, T er Tórshavn og Model domain er myndlaða økið. Nærmynd av Model domain sæst til høgru.*




***Mynd 3**: Rákið av sjógvi tá tað er antin fjarðakent ella sundakent í Sundalagnum norðan fyri Streymin. Reyðu økini vísa norðurgangandi rák. Bláu økini vísa suðurgangandi rák.*

Sundalagið, sum er langt og smalt sammett við onnur sund, skilir Eysturoynna og Streymoynna. Á tí smalasta staðnum, har einans 100 metrar eru millum oyggjarnar, er ein gátt við brúnna um Streymin, ið skal eitast at vera einasta brúgv, sum gongur yvir um Atlantshavið.

Henda smala gáttin er sermerkt á ein annan hátt. Hon samvirkar við amphidroma økið í Tórshavn sum eitt slag av kontakt fyri, hvussu sjógvurin í Sundalagnum norðan fyri Streymin verður útskiftur.

### Ein kontakt avger vikuliga sjógvútskifting í Sundalagnum norðan fyri Streymin

Úrslitini av FarCoast myndlinum hava víst, at ein vikulig útskifting er í Sundalagnum norðan fyri Streymin. Við at miðla rákið av sjógvi í 25 tímar, koma vit fram til mynd 3. Myndin vinstru megin lýsir tað vit nevna fjarðakent rák, meðan myndin høgrumegin lýsir sundakent rák. Tá rákið er fjarðakent, síggja vit umleið helvt um helvt av tí reyða og tí bláa litinum. Tað reyða merkir í hesum førinum,

***Mynd 4(a)****: Mynd 4(a) vísir sonevnd co-tidal lines. Hetta kortið er gjørt av Defant í 1932 og vísir linjur av hálvdagliga sjóvarfallinum, og hvussu tað ferðast eftir strandarlinjum. Á mynd 4(b) á næstu síðu sæst miðal hálvdagliga sjóvarfals alduhæddin úr FarCoast.*




at sjógvurin í miðal rennur norður eftir, og okkara dømi her av Sundalagnum norðan fyri Streymin merkir sostatt, at sjógvurin í tí ovaru helvtini av vatnsúlini rennur norður eftir út úr Sundalagnum og norður um Eiðisgrynnuna.

Vit síggja eisini, at ein partur kemur inn í Sundalagið og fer niður í dýpið, áðrenn sjógvurin ferðast upp eftir, meðan hann fer suður gjøgnum sundið. Tá sjógvurin er komin upp aftur, fer hann norður aftur og út úr Sundalagnum upp um Eiðisgrynnuna.

Á myndini høgru megin síggja vit mest blátt. Hetta merkir, at tað rekur suður stórt sæð allan vegin. Undantakið er lítli, reyði klumpurin, vit síggja ovast á myndini.

Umframt hvønn veg sjógvurin kemur inn og fer út úr sundinum norðan fyri Streymin, er eisini stórur munur á, hvussu leingi tað tekur at útskifta sjógvin í sundinum við sjógv uttaneftir. Tá sundið er fjarðakent, er útskiftingartíðin av botnsjónum 6,5 dagar. Í tí sundakenda tíðarskeiðinum tekur tað 4 dagar at útskifta botnlagið. Tað kom óvart á okkum, hvussu stórur munur tað er frá viku til aðra, at sjógvurin verður útskiftur.

## Amphidromi

Sum nevnt í innganginum er eitt amphidromt øki nærhendis Tórshavn. Eitt amphidromt økið er eitt øki, har tað er lítil munur á flóð og fjøru. Hetta kemst av, at sjóvarfalsaldan ferðast rundan um amphidroma øki. Nógv slík økir eru í heiminum, har sjóvarfalsaldur ferðast fram við strondini. Eitt amphidromi kann lýsast við at man ímyndar sær eina aldu, ið ferðast runt fram við kantinum í einum baðikari. Munur er tá á, hvar aldan er hægst og lægst. Hinvegin vil tað verða eitt punkt mitt í baðikarinum, har vatnstøðan er so at siga tann sama alla tíðina. Hetta




***Mynd 4(b)***

punktið hevði so verið amphidroma punktið í baðikarinum.

Á mynd 4 síggja vit sonevnd *co-tidal lines*. Mitt í Norðuratlanshavi síggjast Føroyar, og at ein hálvdaglig sjóvarfalsalda, eisini nevnd $M_2$, ferðast kring oyggjarnar. Hon verður avmarkað av millum annað norsku og íslendsku strondunum.

Tekningin hjá Defant (mynd 4) er næstan 100 ára gomul, so tað hevur leingi verður kunnugt, at Føroyar hava eitt amphidromisk øki fyri tað hálvdagliga – og eisini tað dagliga – sjóvarfallið. Hinvegin er tað rættiliga nýggj vitan, at Føroyar eisini hava amphidrom økir fyri sjóvarføll, ið hava longri tíðarskeið – mánaðarlig og hálvmánaðarlig.

At tað amphidroma økið mitt í Norðuratlanshavinum liggur nær við Tórshavn, merkir tískil, at amphi-




***Mynd 5****: Einføld lýsing av hvussu rákið kann broytast við sjóvarfallinum nærhendis eitt amphidromt øki.*




*Mynd 6: Lýsing av hvussu sjóvarfallið ávirkar annaðhvørt ein fjørð (ovast), eitt vanligt sund (í miðjuni) ella eitt fjarðakent sund (niðast).*

droma økið liggur sera nær við ella í tí sunnasta partinum av Sundalagnum.

Hyggja vit at mynd 4(b), sæst tað amphidroma økið sum tann violetti liturin. Har er skiftið í vatnskorpuhæddini minni enn 10 cm. Hinvegin er eitt skifti norðan fyri Eiði uppá 60 cm frá miðalstøðuni. Tað er hesin stóri munurin í vatnstøðuni, sum ger eitt hart rák ígjøgnum Sundalagið. Hetta verður lýst á mynd 5.

Landsverk hevur leingi gjørt mátingar av vatnstøðuni á Eiði og í Tórshavn og tí nýta vit hesi støðini, sí kort á mynd 2, til at samanbera við úrslit frá myndlinum. Har merkir T Tórshavn og E merkir Eiði.

## Eitt einfalt dømi

Eitt øki, har lítil munur er á flóð og fjøru, kann nevnast eitt amphidromt øki.

Hyggja vit at døminum á mynd 5, síggja vit, hvussu amphidroma økið kann ávirka rákið. Á myndini er ein svartur prikkur, sum vísir, hvar amphidroma økið er. Har broytist vatnskorpuhæddin næstan ikki. Men um tað fløðir burtur frá amphidroma økinum, rennur sjógvur móti amphidroma økinum. Um tað hinvegin fjarar burtur frá amphidroma økinum, rennur sjógvur frá amphidroma økinum ímóti, har tað fjarar. Hettar er júst tað, sum hendir í Sundalagnum, har amphidroma økið er umboðað við Tórshavn, meðan Eiði er umboðað við tað økið norðanfyri, ið ger, at sjóvarfallið annaðhvørt fløðir ella fjarar.

## Sjóvarfalsrikin sund og firðir

Vanliga tosa vit um sjóvarfalsriknar firðir og sjóvarfalsrikin sund. Hesi eru lýst á mynd 6. Í einum vanligum sjóvarfalsriknum sundi verður nógv mest orka nýtt til at flyta sjógvin ígjøgnum sundið. Tað vil siga, at tá vatnskorpan verður lyft upp, tí tað fløðir, verður eitt rák gjørt, sum flytir nógvan sjógv ígjøgnum eitt sund. Tá tað fjarar, fer rákið antin øvutan veg ella vit fáa kyrrindir.

Hyggja vit at einum sjóvarfalsriknum fjørði, og tað fløðir, síggja vit, at tilgongdin av sjógvi verður nýtt til at lyfta vatnskorpuna upp inni á fjørðinum. Harvið veksur rúmdin av vatni inni í fjørðinum. Tá tað so fjarar, rennur sjógvurin út aftur úr fjørðinum. Á mynd 7 síggja vit, at hetta merkir, at Sundalagið er eitt fjarðakent sund. Tá tað fløðir, verður umleið helvtin av sjónum, sum rennur inn, nýttur til at lyfta vatnskorpuna upp, meðan hin helvtin rennur í gjøgnum forðingina, sum í okkara føri er grynnan við Streymin.

## Langtíðar sjóvarfall (Long-period tides)

Sum nevnt í innganginum er sjóvarfallið eitt slag av kontakt, ið avger, um Sundalagið norðan fyri Streymin er fjarðakent ella sundakent. Hesa niðurstøðu kom eg til við at hyggja at úrslitunum, sum eru víst á mynd 8, har tjúkku linjurnar er miðal dagligi vatnflutningurin tvørtur um antin Eiðisgrynnuna ella Streymin. Her eru nøkur tíðarskeið á umleið eina viku, har flutningurin er annaðhvørt positivur ella negativur. Tá flutningurin er positivur, samsvarar tað við mynd 3 vinstrumegin, tá Sundalagið er sundakent. Er flutningurin negativur, samsvarar tað við mynd 3 høgrumegin, tá Sundalagið er fjarðakent.

Sjóvarfallið, sum vit dagliga fyrihalda okkum til, er fyri tað mesta tað dagliga og tað hálvdagliga sjóvarfallið. Hetta merkir, at vatnskorpan annaðhvørt hevur eitt ella tvey daglig hámørk. Hesi koma av atdráttarmegini millum jørðina, sólina og mánan – og av at jørðin snarar um seg sjálva. Hetta er tann aldan, sum er lýst í mynd 4. Taka vit hesar, ið vit nevna dagligar og hálvdagligar konstituentar, og vísa teir sum í mynd 9, so síggja vit, at munurin millum flóð og fjøru í miðal verður null. Tann bláa kurvan á mynd 9 vísir, hvussu munurin á vatnskorpuhæddini á Eiði og í Tórshavn broytist, um vit einans hyggja at tí hálvdagliga og dagliga sjóvarfallinum. Um vit hinvegin eisini rokna hvussu munurin út frá sjóvarfallinum er, og harumframt rokna við teimum sjóvarfalskonstituentunum við longri tíðarskeiði – mánaðarliga og hálvmánaðarliga – so síggja vit eitt óvanligari skap, ið líkist myndini av sjógvflutninginum í mynd 8. Tí koma vit til niðurstøðuna, at Sundalagið norðan fyri Streymin er eitt fjarðakent sund, sum verður stýrt av einari kontakt, ið aftur verður stýrd av langtíðar sjóvarfallinum.

*Mynd 7: Miðalrákið í Sundalagnum norðan fyri Streymin fyri alt tíðarskeiðið. Litirnir vísa ferðina í rákinum (cm/sekund, positivt norðureftir) í miðal tvørtur um sundið.*







*Mynd 8: Mongd av sjógvi flutt yvir Eiðisgrynnuna (reyði liturin), og yvir Streymin (blái liturin). Mongdin er positiv (oman fyri strikuna), tá sjógvurin ferðast norðureftir. Tunnu strikurnar eru tímavirði. Tjúkku strikurnar eru miðal yvir 25 tímar.*




*Mynd 9: Munur millum vatnskorpuhædd á Eiði og í Tórshavn út frá mátingum hjá Landsverki. Vinstrumegin er bara hálvdagligt og dagligt sjóvarfall. Høgrumegin er langtíðar sjóvarfallið tikið við afturat.*

## Bókmentir:


1) Erenbjerg, S. V., Albretsen, J., Simonsen, K., Olsen, E. L., Kaas, E., and Hansen, B.: A tidally driven fjord-like strait close to an amphidromic region, Ocean Sci., 17, 1639–1655, https://doi.org/10.5194/os-17-1639-2021, 2021

2) Erenbjerg, S. V.: Oceanography of the Faroe Shelf and Sundalagið Norður – A modeling approach, (PhD. thesis), University of Copenhagen 2021, Niels Bohr Institute.

# DESTINATIÓNS-BYGGING

Eitt nýtt slag av tjóðar- og staðarbygging. At byggja land við kreativiteti, innovatión, mentan og list.



**Bergur Rønne Moberg**
bergurmoberg@yahoo.dk
Lektari, ph.d.
Institut for Nordiske Studier
Københavns Universitet

## Kreativur búskapur og Føroyar sum ferðamál

Føroyar eru av álvara vorðnar altjóða ferðamál og ein kreativur búskapur. Hesi bæði viðurskifti hanga saman sum eitt nýtt slag av romantikki, sum dyrkar autentisitet og burðardygd. Romantikkur snýr seg í hesum høpi um at brenna fyri sakini og vera dedikerað/ur, og romantikarnir í dag eru eitt nú íverksetarar og kreativir mentanarentreprenørar.

Í nýggja føroyska romantikkinum er tað ikki tjóðin einaferð enn, sum skal byggjast, men heldur Føroyar sum ferðamál og sum samfelag við einum nýggjum kosmopolitiskum medviti. Her verða tvinnanda eygnabrá greipa saman: tað eygnabráið uttaneftir, ferðafólk og vit sjálvi festa á okkum sjálvi sum føroyingar, og so okkara eygnabrá innaneftir.

Hesi eygnabrá møtast í einari nýggjari sjálvsfatan



Mynd: Finnur Justinussen




Mynd: Finnur Justinussen



Fyri ikki so langari tíð síðan var forkunnugt at møta fólki í fjøllunum, men í dag síggjast á øllum árstíðum heilar gongur av fólki allastaðni í føroysku høgunum. Mynd: Ólavur Frederiksen



Føroysk landafrøði er farin frá at vera gerandisliga nyttuborin til náttúruperlur og autentiskur og burðardyggur náttúrukapitalur fyri ferðavinnu sum fyri alla ta vaksandi destinatiónsmentanina

sum fólk og einstaklingar; tey eru við at broyta alt tað føroyska samfelagið við einum kreativum entreprenøranda og einari nýggjari, meira opnari mentan. Útvenda síðan av hesum er ein nýggj tilvitan um at branda Føroyar, meðan innvenda síðan er burðardygg samleikaumsiting.

KALDAR OYGGJAR eru vorðnar cool, og Føroyar branda seg og sítt landslag, náttúrutilfeingi, mentanartilfeingi og list við góðum úrsliti. Landið hevur ikki einans fingið eitt nýtt brand sum vælumtókt ferðamál, men eisini eitt nýtt vinnulív og ein nýggjan opnari samleika, sum ikki einans ringir seg inneftir um endurnýggjaða tjóðarbygging, men eisini úteftir um at byggja Føroyar sum ferðamál í altjóða høpi.

Hetta skiftið hevur havt við sær róttøknar broytingar. Føroyar og føroyingar byggja land og tjóð á nýggjan hátt. Í dag snýr tað seg ikki einans um at byggja land við lóg, vinnulívi, umsiting og síðbundnum landaskili, men eisini við mentan, villum kreativiteti, innovatión, sum enntá umfata hugflog og listaliga skapan, sum vit annars eru von við at hava í útryðjuni av vinnu- og vælferðarborna samfelagsmaskinarínum, hóast gamaní meira í miðjuni í mentanarligum og tjóðskaparligum høpi.

Eg eri í hesum sambandi í mínari nýggjastu gransking komin fram við nýggjum hugtaki – 'destination building' – sum er vorðið presenterað í vísindagreinum á enskum og donskum (sí bókmentalistan). Mergurin í hesum greinum er, at Føroyar eru farnar frá tjóðarbygging til destinatiónsbygging.

## Føroyar fingið nýggjan puls

Fyri bara nøkrum fáum árum síðan vórðu bøkur sum *Exit Føroyar* (2014) útgivnar, sum lýstu døpru gongdina við fráflyting úr Føroyum, sum vardi frá umleið 1992-2009. Henda gongd hevði við sær, at fleiri eldri fólk vóru í landinum. Um sama mundið skipaðu føroyskir myndugleikar fyri tiltøkum í Keypmannahavn fyri útisetum til tess at vísa teimum á arbeiðsmøguleikar í Føroyum.

Í dag er støðan nærum vend á høvdið, og við økta fólkatalinum í huga tykist hesin trupulleiki loystur. Ferðavinnan og góða gongdin í búskapinum hava givið Føroyum ein nýggjan puls, og hesin pulsur pumpar í einum kreativum búskapi, sum stórt sæð koblar mentan og vinnulív saman. Til fyri stuttum vóru Føroyar ein ferðavinnuland 'off the beaten track', men so hvørt sum kaldar oyggjar eru vorðnar meira cool ferðamál, er landið av álvara farið at merkja trýstið frá øktu ferðavinnuni.

## Ein spreinging av kreativiteti

Í kjalarvørrinum av at Føroyar eru vorðnar vælumtókt ferðamál, upplivir landið í dag eina spreinging av kreativiteti innan tónleik, gastronomi, design, klædnamóta, reklamur og íverksetan av ymsum slag. Tað er sostatt ikki longur einans listin, sum umboðar kreativitet, men eisini eitt margfeldi av nisjuferðavinnum. Landið hevur fingið ein nýggjan puls, og hesin pulsur pumpar í einum kreativum búskapi, sum koblar millum mentan og vinnulív. Frá almennari, mentanarpolitiskari síðu verður list fatað sum ein brandandi útflutningsvøra, og fólk eru sett í starv til at taka sær av at promovera og positionera Føroyar uttanlands sum bókmenta-, films- og tónleikaland.

Føroyar eru vorðnar ein bráðpanna fyri einum nýggjum samfelagi og einari nýggjari mentan við kreativiteti og innovatión sum slóðarum. Hetta fer fram innan nýggjastu knubbanøringina í nisjuferðavinnunum og fer eisini fram innan fiskivinnuna, sum á sølumessum brúkar føroyska list til at branda og selja sínar vørur. Tað styttist av álvara millum fisk og list, vinnu og mentan.

## Føroyska útgávan av 'gentrification'

Momentum fyri kreativum búskapi og nisjuferðavinnu í Føroyum hevur eftir stuttari tíð broytt føroyska mentanarlandslagið. Fjós, hoyggjhús, handl-

ar, saltsilo, meiarí, vaskarí, pakkhús og aðrir bygningar umskapast til eventmiðdeplar, sjónleikarahús, framsýningarhøli, restaurantir, vínstøð og ølbarrir. Hetta kann kallast føroyska útgávan av 'gentrification', har rík fólk keypa ognir í bíligum umhvørvum við tí úrsliti, at hesir býarpartar gerast munandi dýrari at búgva í. Sama er hent í økinum kring Tinganes og Húsabrúgv í Havnini, sum er gastronomiska høvuðsmiðstøð Føroya.

Um ferðavinna er ein vill broytingarkraft, sum ofta verður sagt, so er mentanarferðavinna við øllum hesum kreativiteti á breddanum eitt lokalt svar til hesa broytingarkraft; men tað er eitt svar, sum er mentan í víðari forstand, enn hon ofta verður hugsað. Talan er um tað, Appadurai kallar „Locality-building“,[1] og sum júst er ein máti at svara tí javnandi og anonymiserandi ávirkan, sum alheimsgerðin á mangan hátt hevur á staðið.

Men samstundis elvir 'gentrification' á hesum støðum til demografiskar broytingar, sum homogenisera teir broyttu býarpartarnar. Ferðafólk fylkjast á hesum støðum, men fólksliga margfeldi hvørvur. Jaktin eftir autentisiteti innan ferðavinnu og destinatiónsbygging kann sostat hava øvutan virknað.

Handilslig og byggifrøðilig konformisering kring um í heimsins stóru og størstu býum er ofta so ógvislig, at man skjótt kann fara at ivast í, hvørjum býi man er í. Brigdi, søga, karakterur, samleiki – alt hetta er burtur í hesum (stór)býarhøpum. Edward Casey kallar hesa gongd eina monomentan grundaða á vesturlendsk (mest amerikansk) búskaparlig og politisk paradigmir.[2]

Henda spreinging av kreativiteti og innovatión, sum vit eru vitni til um alt landið, stingur djúpari enn tað vinnuliga og eisini djúpari enn mentan í almennari fatan. Her er eisini talan um eina spreinging av sjónarringum, sum broyta og fara at broyta Føroyar eins grundleggjandi sum fiskivinnusamfelagið um aldamótið 1900 og seinni broytti Føroyar frá at vera eitt bóndasamfelag til at blíva ein modernaðan peningabúskap.

Í restini av greinini hyggja vit nærri at teimum týðiligastu avleiðingunum av destinatiónsbygging, sum er ein nýggjur entreprenørandi, ið fatar um alt frá list til vinnulív.

## Entreprenørandin á staðnum

Undir destinatiónsgongdini býr ein serlig hugsan um staðið sum ein serligur andi, sum eitthvørt autentiskt, sum altíð er afturkennandi og sum er væl skilmarkað frá øðrum støðum. Henda hugsan er mest kend úr rómverskum høpi sum ein religiøs hugmynd um *genius loci*, sum merkir andin á staðnum. Talan var um staðsins verndarandar, sum rómverjar ofta myndaðu í sínari religiøsu ikonografi.

Sambært C. Norberg-Schulz og hansara fenomenologisku greiningum av byggifrøði er *genius loci* ein livandi andi, sum heldur viðlíka staðareyðkenni gjøgnum framhaldandi umskapan. At virða *genius loci* vil sambært Norberg-Schulz bæði siga at avgera staðsins samleika og framhaldandi at tulka hann upp á ævigt nýggjar mátar. Á henda hátt, sigur hann, kann man tosa um eina livandi siðvenju, ið veitir broytingum meining við støðugt at festa tað, sum hendir á staðnum í lokal fyribrigdi.[3]

Í modernaðum alheimshøpi við øktari vistfrøðiligari tilvitan skriva staðgranskarar um eitt *genius loci*, sum er vorðið til eitt *genius globi*, ein heimsanda. Tað lokala og globala hanga neyvt saman. Vistfrøðilig tilvitan hevur givið almenninginum tað, sum listin fyri langari tíð síðani hevur givið sínum dyrkanum: eina fysiska kenslu av Jørðini, og av at alt hongur saman.

Henda hugsan livir víðari í romantiskari hugsan skilt sum ein framhaldandi modernað hugsan um staðið. Romantikkur er ikki einans eitt tíðarskeið í evropeiskari lista- og mentasøgu, men eisini eitt áhaldandi andligt rák. Tosað verður um eina nýggja bylgju innan romantikk, sum verður rópt ein fagurfrøðilig romantisk seinkapitalisma og glokalisering – har tað lokala og tað globala frukta hvørt annað.[4]

Men hvat er við romantikkinum, sum verður fest í ferðavinnu, innovatión og kreativan búskap? Strembanir innan romantikk snúgva seg í hesum høpi um at seta hugflog saman við meira og minni vinnubornum kreativiteti. Henda kobling millum hugflog og kreativitet í víðkaðan forstand hevur sambært fenomenologinum Edward S. Casey livað víðari í Vesturheiminum í skaldskapi, málningalist, tónleiki, myndahøggaralist og ástøði: „It becomes a credo for over a century“, sum Casey tekur til í sínari bók *Imagining* (s. 184).

Hesin romantiski andi er nú vorðin umskapaður til ein glokalan entreprenøranda, sum fremur lokalar prosessir sum reaktión uppá og móti globalum prosessum. Seinkapitalistiski entreprenørandin á staðnum er dømi um romantiska víðkan av genius loci til eitt genius globi. Standardiserandi og javnandi alheimsgerðin hevur við øðrum orðum fingið eitt samsvarandi heimsumfatandi lokalt svar.

Innan karmarnar av romantiskari mentanarkapitalismu kann staðarandin verða íbundin entreprenørandan á staðnum við startupp-virkjum, kreativum mentanarentreprenørum og fyritøkum, sum ganga




á odda at byggja brúgv millum mentan og búskap. Nýggjar vinnulívsbransjur sum hesar menna staðið við at hugsa burðardygt. Talan er eitt nú um fyritøkur sum Ocean Rainforest, Visit Faroe Islands, NAX, Boating.fo og Fair Isle Distillery,[5] sum allar vilja framleiða burðardygt og samstundis branda seg og Føroyar við at undirstrika autentisk viðurskifti í sjálvari framleiðslutilgongdini ella við ymsum viðurskiftum, sum á serligan hátt endurspegla føroyska náttúru og mentan.

## Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen sum ferðavinnuslóðarar

Destinatiónhugsan stavar ikki einans frá ferðafólki. Føroyingar eru vorðnir ferðafólk í egnum landi. Ferðavinnuperspektivið við dupultum eygnabrá stavar upphavliga úr bókmentaheiminum: úr verkum Jørgen-Frantz Jacobsens og William Heinesens. Teir hava verið slóðarar í tí ráki, sum í dag alt í einum hugsar vinnuframleiðslu, burðardygd, kreativitet og innovatión, og sum ofta festir hesa nýhugsan innan framleiðslu í bæði samleikaumsiting og (mentanar) branding, sum ávikavist umboða eygnabráið uttanífrá og innanífrá.

Júst sum William og Jørgen-Frantz í sínum søgum, essayum og ferðafrásagnum, eru føroyingar sum ferðafólk í egnum landi nú vorðnir raktir av antropologiska dupulteygnabránum, ið á mangan hátt er maskinrúmið í skapanini hjá hesum báðum rithøvundum. Teir høvdu báðir eina hálvdanska bakgrund og skrivaðu (mest) á donskum. Teir sóu av tí sama Føroyar í størri fráleika, men eisini í einum serligum trúnaði og varnum kæti, sum í dag umboðar teirra signatur sum listafólk.

## Jørgen-Frantz um komu-mentan

Eins og VFI vóru William og Jørgen-Frantz báðir stórbrúkarar av føroyskari landafrøði. Teir brúktu

*James Bond legði (fyribils) beinini á Kallinum á Kalsoynni, og tað hevur havt við sær upp aftur eitt destinatiónstiltak. Gravsteinurin hjá James Bond dregur James Bond-fjepparar og onnur til landið. Mynd: Sverri Egholm*



yvirhøvur sína føroysku bakgrund til ikki einans at siga spennandi søgur, men í roynd og veru eisini til at branda seg sum rithøvundar.

Av tí sama kalla teir Føroyar ein undirheim, og William kallar seg barbar, dilletant, amatør, obskurant og tossefugl, sum gevur ábendingar um, at hann við hesum strembaði eftir at skilja seg út sum rithøvund í einum størri høpi enn tí føroyska.

Bøkur Jørgen-Frantz og Williams eru á tremur við ferðandi figurum, ferðaperspektivum og hybridum mentanarmøtum, sum er partur av tí, at teir síggja seg sjálvar og Føroyar uttanífrá og í einum størri høpi enn tí føroyska. Teir branda í roynd og veru Føroyar og seg sjálvar í einum taki.

Jørgen-Frantz byrjar sína ferðafrágreiðing *Færøerne, Natur og Folk* (1936) við hesum setningi: „Ældre beskrivelser af Færøerne har ofte en optakt som til en robinsonade“ (Jacobsen 1936: 3).

Jørgen-Frantz tilognar sær hesar lýsingar av Føroyum í *Barbara* (1939), sum er ein robinsonada í týdninginum ein skaldsøga um skipbrotnar lagnur á fjarum oyggjum, sum í hesum føri eru Føroyar. Hann ger sær dælt við eksotiskum ferðafrásagnarperspektivi við at gera Føroyar til tað, hann næstan nevnir eina komu-mentan ella til eina modernaða bókmentaliga destinatión. Hann skrivar hesi orð í brævi til vinin William í 1922:

> den traditionelle ’ankomst-genre’: at man grundigt omkalfatrer og eksotiserer Færøerne og Tórshavn for derved at lade dem fremtræde langt mere friskt og levende og – jeg havde nær sagt – realistisk. Det er en god opfindelse. Men er du klar over, at Færøerne overhovedet ikke kan bære sig uden tilsætning af noget udenlandsk? (Heinesen og Jacobsen 2019: 108)

Her umrøður Jørgen-Frantz sum tann fyrsti Føroyar ikki einans sum eina destinatión, sum vit kenna frá útlendskum ferðafrásagnum, men eisini sum eina destinatiónsmentan: at Føroyar ikki bara eru eitt land, man býr í, men eisini eitt land, sum verður vitjað, sætt og mett av øðrum og at eygnabráið uttanífrá hevur avgerandi týdning fyri fatanina av tí at búgva í Føroyum og serliga hjá teimum skrivandi og skapandi kreftunum, sum alla tíðina hava brúk fyri allari hugsandi hugkveiking og inputti.

Destinatiónseygnabráið ger ein til ein betri eygleiðara, og av tí sama skara føroyalýsingar Williams og Jørgen-Frantz so nógv framúr, sum tær gera.

## Føroyar sum ein ‘un-destination’

Til tess at undirstrika Føroyar í kapping við onnur ferðamál hevur VFI seinastu árini í sínum succesríku kampanjum pallsett Føroyar sum eitt serligt slag av komu-staði ella destinatión, sum tey kalla ’Un-destination’.

Í einari kampanju frá 2013 verða Føroyar í tekstum og myndum presenteraðar sum ein undantakslandafrøði og sum ein attraktivur ’annar heimur’ við *brandandi* orðingum sum „Untold, Unspoiled, Unexplored, Unbelievable“ (www.visitfaroeislands.com). Hesi fýra orðini bera boð um eina ímynd um eitt ferðamál, sum er eitt reint, ónomið og óuppdagað land.

Veðurlagsbroytingar hava skerpt sansin fyri og týdningin av einum reinum umhvørvi og ónomnari náttúru. Av tí sama kann sigast at henda kampanjan hjá VFI brúkar føroyskt landslag sum sterkan náttúrukapital. Boðskapurin kann tulkast sum, at í Føroyum kann man njóta at vera ferðandi og eitt slag av kanningarfara í einum ‘nýggjum’ ferðamáli. Føroyar verða her lýstar sum útryðja og oyggjar flestar í ferðamannahøpi: sum ein ímynd um eina serstaka landafrøði og sum eitt autentiskt stað langt burtur frá stórbýum og meginlondum.

Tílík tilvitað eksotisering av Føroyum er eisini arvur eftir Jørgen-Frantz og William. Nevnast kann í hesum sambandi, at føroysk ferðavinna saman við politikarum og øðrum, sum umboða Føroyar í altjóða høpi, ofta hava brúkt byrjanina í kendastu skaldsøgu Williams *De fortabte Spillemænd* (1950) “…ude i det kviksølvlysende hav ligger der et ensomt lille blyfarvet land …“ Her kemur frásøgufólkið flúgvandi uttanífrá til eitt fjarskotið land langt úti í heimshavinum, og hvat liggur betri fyri at eksotisera enn tað fjarlagna?! Í tí fjara verður alt til poesi, sum romantiska skaldið Novalis tók til.

## At selja dreymin um fjarskotnar oyggjar

Ferðavinna snýr seg nevniliga sambært ferðavinnugranskaranum Frans Schouten um at selja dreymar. William og Jørgen-Frantz vistu, at teir høvdu eina landafrøði ‘høgt móti norðri’, sum kundi ‘seljast’ ella sum kundi vekja ans og dreymar millum skaldsøgulesarar í Danmark og á meginlandinum yvirhøvur. Tí gjørdu teir nógv burtur úr Føroyum sum evni og at skriva um Føroyar við støði í einum ferðavinnukendum perspektivi. Av tí sama gjørdist ferðin, ferðandi figurar og ferðalýsingar miðstødd evni í teirra skriving.





*Føroyingar eru vorðnir ferðafólk í egnum landi við at kalla sama dupulteygnabrái á oyggjar sum antropologar.*

Ein avleiðing av hesum fráleikans perspektivi var at gera føroyska lítilheimin til symbol fyri verðina alla. Í einari viðmerking nevnd „Den virkelig store kunstner“, sum stendur at lesa í hondskrivaðari notatbók hjá Williami í hansara skjalagoymslu, skrivar hann t. 22. apríl 1969: „Den „lille“ sammenhæng eller pointe vrages. Kun „det store i det små“ har interesse.“[6]

William og Jørgen-Frantz vistu, at Føroyar vóru ein ‘nýggj’ landafrøði í evropeiskum og alheimsligum høpi, og at fátt kann fáa menniskjur at droyma so nógv um eksotisk ferðamál, sum fjartliggjandi oyggjar. Hóast nógv er hent í Føroyum og í viðurskiftunum millum Føroyar og útheimin, so er framvegis hugkveiking at heinta í hesum perspektivi.

Eitt aktuelt dømi er sjónvarpsrøðin *Trom*, sum er vorðin kallað ein ferðamannakrimi, tí hon sum so nógvir aðrir norðuratlantiskir filmar og røðir leggja dent á at lýsa eitt noir-kent norðuratlantiskt landslag.

Av tí sama síggja vit eisini VFI reklamera fyri Føroyum sum eitt ferðamannaland á líkan hátt sum William og Jørgen-Frantz við at síggja Føroyar uttanífrá sum ein ’annan’ heim. Á henda hátt jagstrar nútímans ferðavinna tað, sum Andreas Reckwitz kallar tað singulera, tað serstaka, sum svarar til eina hugmynd um tað autentiska. Reckwitz undirstrikar í sínari bók *Die Gesellschaft der Singularitäten* dyrkanina av tí autentiska og makaleysa sum eitt romantisk eyðkenni við nýggju mentanarkapitalismuni, sum fevnir um bæði mentan og marknað.

## Ferðavinna millum rutur og røtur

Skjótt vaksandi mentanarferðavinnan kring um í heiminum hevur havt við sær vaksandi áhuga fyri at brúka tjóðarinnar mest markantu figurar um eina leið í marknaðar- og mentanarhøpi. Teir kunnu brúkast til at branda tjóðir og býir, samstundis sum ein víðkað nýtsla av hesum figurum er vælegnað til eisini at umfata innari viðurskifti í mentanini sum samleikaumsiting.

Vit síggja hesar figurar á velinum á øllum heimsins flogførum, sum branda tjóðirnar í altjóða høpi; eisini í Føroyum, har flogfør hjá Atlantic Airways hava fingið nøvn sum William, Ingálvur, Sámal og Elinborg.

Hesi børn av tjóðunum roynast úteftir í netverkssamfelagnum sum branding og landvinnarar og í innlendishøpi sum samleikaumsiting og endurhugsan av mentanararvinum. Á henda hátt umboða hesi eitt dynamiskt krossøki millum rutur og røtur.

## William Heinesen sum brand og mentanarikon

Serliga William er vorðin eitt vælumtókt føroyskt brand millum almennar sum privatar aktørar. Niðanfyristandandi eyðkenni eru millum tey, sum gera William til eitt gott føroyskt mentabrand:



*William Heinesen uttan fyri barndómsheimið hjá pápanum í Bø.*

- Lívsverk Williams sum ein modernað Føroyingasøga
- William hevur verið andlit Føroya útetfir í 20. øld og er framhaldandi eitt slag av mentanarambassadøri
- William koblar nýtt og gamalt saman í nýggjum samansetingum og skapar ein kosmopolitiskan lokalan samleika
- Traditiónsberandi og nýskapandi
- Otto Gelsted kallar Hans Scherfig „Et talent med tre hoveder". Sama er við Williami, sum er marglistafólk við trimum høvdum: rithøvundur, myndlistafólk og tónasmiður
- Býarikon og heiðursborgari í Havn
- Hansara søgur ímyndin av gomlu, pittoresku Havnini
- Nógvir bygningar í býnum siga søgu Williams
- Innstillaður til Heiðursløn Nobels 2 ferðir í 2 londum
- Problematiskur figurur í sínari samtíð religiøst, tjóðskaparligt og politiskt, sum bara ger Williams-brandið uppaftur meira áhugavert
- Sær Føroyar samstundis uttan- og innaneftir

Alt hetta og nógv aftrat ger William vælegnaðan sum føroyskt mentanarikon. Samanumtikið kann man siga, at hesi eyðkenni rúma stórum søgumøguleikum við atliti at branding. Vaksandi áhugi hevur av tí sama verið fyri Williami seinastu árini. Men sum heild kann sigast, at hansara momentum er partur av momentum fyri kreativum búskapi og nisjuferðavinnu í Føroyum í dag.

## Ein nýggj søga um Føroyar

Við destinatiónsbyggingini er ein nýggj sterk søga um Føroyar vorðin til. Tær árinamiklastu søgurnar um Føroyar í føroyskari mentan eru kristindómurin og bygdasøgurnar ella lokalsøguligar frásagnir sum bókaverk og bandaðar frásagnir. Við nýggju destinatiónsmentanini er modernað mentan fyri fyrstu ferð av álvara komin heilt fram á forgólvið í føroyskum vinnu- og samfelagshøpi og er við til at allýsa, hvat og hvørjar Føroyar eru og fara at vera. Tað er í hesum høpi við einum sterkum entreprenøranda, kreativiteti, innovatión og við einum antropologiskum dupulteygnabrái sum almannaogn, at føroyska destinatiónsbyggingin fer fram, og tað er í hesum høpi, at føroyingar eru vorðnir 'gerandiskosmopolittar' (Larsen 2007: 54-55).

## Samanumtøka

Greinin hevur lýst høvuðspartar av menningini av Føroyum sum ein nýggj destinatiónsmentan við støði í nýggja rákinum og hugtakinum 'destinatiónsbygging'. Henda bygging er lýst sum ein nýggjur entreprenørandi á staðnum við brúgvum millum mentan og vinnulív millum gransking og vinnu.

Talan er um eitt paradigmuskifti í samfelag sum í mentan og sostatt meira enn bara ein stokkutur tíðarandi. Greinin teknar í hesum sambandi eisini leysliga tær djúparu broytingar, sum loða uppi við hesum skifti við samhoyrandi kreativitetsspreingingum.

Dentur hevur verið lagdur á føroyskar ferðavinnukampanjur og dansktskrivandi føroyskar rithøvundar sum William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen, sum hvør á sín hátt hava havt avgerandi týdning fyri føroyska destinatiónsbygging.

Við VFI í oddinum eru Føroyar seinastu árini settar á heimskortið sum ferðamannaland. Men umleið 80 ár frammanundan settu Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen Føroyar á Evropakortið og meira enn so við sínum skaldsøgum.

Greinin hevur lýst óvæntaða sambandið millum VFI og hesar rithøvundar, við tað at VFI leggur seg í kjalarvørrin av Williami og Jørgeni-Frantz við at promovera Føroyar sum ein eksotiskur 'annar' heimur. Eins og William og Jørgen-Frantz brandaðu seg í altjóða høpi sum rithøvundar frá einari serligari, 'øðrvísi' landafrøði, soleiðis brandar VFI Føroyar sum eitt autentiskt undantaksstað í Norðurhøvum.

Ferðavinna og destinatiónsmenning av Føroyum sum ferðamannaland hava og fara at broyta Føroyar varandi og grundleggjandi. Destinatiónsbygging viðvíkur einum 'áðrenn' og einum 'aftaná'. Føroyar eru broyttar til eina so vælumtókta destinatión, at sjálvt ringasta illveðrið kann seljast í ferðamannahøpi.

Samstundis er búskapurin ikki bara styrktur av álvara, men eisini sundurgreinaður og moderniseraður og betri framtíðartryggjaður enn áður. Talan er við øðrum orðum um eina stórbroytingartíð í Føroyum mentanarliga og búskaparliga, sum er klondyke-kend. Nógv fólk flyta til Føroyar, stórur vøkstur er í landinum, lyklatøl vísa vakurt hækkandi formkurvar, sum boða frá framgongd; fólkasamansetingin yngist, samstundis sum lønirnar eru faldaðar fleiri ferðir seinastu 10-15 árini.

Sum vera man eru fleiri rák, sum hava skapt hesa støðu, men hugtakið destinatiónsbygging hevur nóg mikið av forklaringskraft í sær til at samla træðirnar í tí kosmopolitiska og kreativa ráki, sum hevur gjørt vart við seg í Føroyum fyrstu áratíggjuni í 21. øld.

Føroyar eru farnar frá tjóðarbygging til destinatiónsbygging. Hetta er ein nýggj landnámstíð, tí alt í landinum má nemast, kortleggjast, hugsast og forteljast av nýggjum. Tað er júst tað, destinatiónsbyggingin ger.

## Notur

1 Appadurai, s. 183.
2 Casey, s. xiii.
3 Harvey, s. 180.
4 Østman og Thøgersen, s. 4.
5 Lilleng og Martyn-Hemphill, s. 1-20.
6 Heinesen 1967-1970, s. 86-87.

## Bókmentir:


Appadurai, Arjun 2005. Modernity at Large. University of Minnesota Press.

Casey, Edward S. 2013 The Fate of Place. A Philosophical History.

Harvey, David 2009. Cosmopolitanism and the Geographies of Freedom. University of Minnesota Press.

Moberg, Bergur Rønne (ávegis til at koma út 2022). „The Ultraminor to Be or Not to Be. Deprivation and Compensation Strategies in Faroese Literature". Ultraminor World Literature. Bergur Rønne Moberg, ritstj. Brill/Rodopi.

Moberg, Bergur Rønne (ávegis til at koma út 2022). „Føroyar sum bókmentalig komu-mentan. Eksotiseringar og sjálveksotiseringar hjá Williami Heinesen, Jørgeni-Frantz Jacobsen og í føroyskari ferðavinnu." Frændafundur nr. 10. Greinasavn frá føroyskt-íslendskari ráðstevnu í Tórshavn 16.-18. august 2019. Tórshavn: Fróðskapur.

Moberg, Bergur Rønne (ávegis til at koma út 2022). „Branding the Faroe Island as a 'New' Literary Geography. William Heinesen and Destination Building." Material Culture in the North. Thor Mednick, ritstj.

Moberg, Bergur Rønne 2021. „Fra 'nation building' til 'destination building'. Eksotiseringer og selveksotiseringer i en 'ny' destinationskultur med særligt henblik på digteren William Heinesen og færøsk turisme." Radierende Felter. Prosaens litterære laboratorium. Ráðstevnuantologi. Bergur Rønne Moberg, ritstj. Forlaget Multivers, 200-249.

Moberg, Bergur Rønne 2021. „The Barbarian and the New Geography. Accelerated Development and Contemporaneity in Faroese Literature." Patricia Gwozdz, Tobias Kraft, Markus Alexander Lenz, ritstj. Bilder in Bewegung. Ansichten des Bildlichen Zwischen Kunst und Wissenshaft. Festschrift für Ottmar Ette. De Gruyter, 239-249.

Moberg, Bergur Rønne 2021. „Færøerne som en litterær destinationskultur. Geografiske perspektiver på eksceptionalisme som eksotisering og selveksotisering i ø-skildringer i dansksproget litteratur om Færøerne. IASS-antologi. Torben Jelsbak, Jens Bjerring Hansen og Anna Estera Mrozewicz, ritstj., 225-245

Harvey, David 2009. Cosmopolitanism and the Geographies of Freedom. University of Minnesota Press.

Lilleng, Kaja Kirstine og Richard Martyn-Hemphill: „Where There's a Wool, There's a Way: Eight Faroe Islands Startup Teams to Watch in 2021." Blog https: Medium.com/the org

Østman, Jan-Ola og Jacob Thøgersen 2010. „Language Attitude and the ideology of the Nordic." Journal of the Sociology of Language. Alexandre Duchene og Florian Coulmas, ritstj. De Gruyter, 97-127.

Lilleng, Kaja Kirstine og Richard Martyn-Hemphill 2021. „Where There's a Wool, There's a Way: Eight Faroe Islands Startup Teams to Watch in 2021." Blog https: Medium.com/the org, 1-20

Heinesen, William 1967. „Den virkelig store kunstner" 22.4.1969. Notatbókin 4.12.1967-8.11.1970. Kapsul 17. Arkivsignaturur Tilg. 677, 70-77. William Heinesens arkiver. Det kgl. Bibliotek.

Østman, Jan-Ola og Jacob Thøgersen: „Language Attitude and the ideology of the Nordic." Journal of the Sociology of Language. Alexandre Duchene og Florian Coulmas (ritstj.). De Gruyter, 2010.

Larsen, Svend Erik 2007: *Tekster uden grænser. Litteratur og globalisering.* Aarhus Universitetsforlag.

Reckwitz, Andreas 2017. *Die Gesellschaft der Singularitäten. Zum Strukturwandel der Moderne.* Suhrkamp.

Jacobsen, Jørgen-Frantz. *Færøerne. Natur og folk.* Tórshavn: Pf. H.N. jacobsens Bókahandil, 1953








# SAVNANDI SAVNSDAGUR

Tekstur: Mass Hoydal  Myndir: Bjarni Árting Rubeksen

„Søvn hava ein týdningarmiklan leiklut í einum demokratiskum samfelag. Tey savna, skráseta og varðveita okkara søgu. Við miðlan og gransking fáa vit óhefta vitan. Í meldrinum av meiningum og kunning á alnótini, er leikluturin hjá søvnum nógv broyttur. Vóru søvnini meira atkomilig á alnótini, vildi fundamentið av vitanini í søvnunum eisini kunnað ment tað almenna kjakið fram móti einum betri fólkaræði."

**Tað var ein av niðurstøðunum** á Savnandi Savnsdegnum fríggjadagin 3. juni. Dagurin var hildin í Kringvarpsforhøllini, sum var á tremur við fólki. Verkætlanin SavnsGull stóð fyri tiltakinum. Høvuðsspurningurin á degnum var, um fólk í grundini vita, hvørjum søvnini arbeiða við, og hvønn týdning arbeiðið hevur fyri almenningin? Umboð fyri tey ymisku søvnini greiddu frá hesum við hvør sínum tema.

Søvnini eru Kringvarp Føroya, Landsbókasavnið, Tjóðskjalasavnið, Føroya Listasavn og Tjóðsavnið.

Sum savnsbrúkarar vóru Annika Sølvará og Bergur Djurhuus Hansen boðin at siga sína hugsan týdningin av søvnum í dag. Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, bjóðaði vælkomin og setti dagin.

